# Kongsumsiting, skattur, líkningareindir og fólk í tí føroyska skattlandinum umleið 1300-1600

## Royal administration, taxation, assessment units and population in the Faroese tax-land approx. 1300-1600

Fróðskaparrit 67 (2021): 36-80
©The Author(s) 2021 Open Access under Creative Commons by Attribution License. Use, distribution and reproduction are unrestricted. Authors and original publication must be credited.
DOI: 10.18602/fsj.v0i0.127
www.frodskapur.fo/

**Andras Mortensen**[1*]

[1] *Søgu- og samfelagsdeildin, Fróðskaparsetur Føroya*

### Abstract

The article examines the royal administration and taxation of the Faroese "skattland" or tax-land in the period between approx. 1300 and 1600 based on a retrospective methodology. Questions are asked about, how the tax was assessed, how many taxpayers there were, how many people they represented, what the tax was used for, and how great the burden was of the royal tax. The royal administration of the 16$^{th}$ century was established with the Landlaw of King Magnus the Lawmender before 1280, but the sources indicate that it was not fully expanded with a Lawthing before 1350-1400. In the land register from 1584, we get the earliest overview of the royal tax system, and the sources from the 16$^{th}$ and 17$^{th}$ centuries tell that the tax was a substitute for the *leidang*. The tax system in the land register suggests that taxable farms were listed based on a past farm count. A comparison of the fragmented Faroese source material from the High and Late Middle Ages with information from other skattlands in the Norwegian realm indicate that this past time has been approx. 1300. The land register therefore provides information concerning how many taxable farms were in the Faroe Islands in approx. 1300, and where they were. The study shows that approx. 2.471 people lived in the Faroe Islands when the tax scheme was launched approx. 1300 and approx. 3.460 people in 1584. When the number of taxpayers is compared with information from the bailiff's accounts in the 17th century, they indicate that the royal tax-rate of Faroese taxpayers was between 4 and 5% of their production in the period between approx. 1300 and 1600.

[*]E-mail: andrasm@setur.fo; ORCID iD 0000-0002-5819-5192

**Úrtak**

Í greinini verður tann kongliga umsitingin og skattingin av tí føroyska skattlandinum í tíðarskeiðinum millum umleið1300 og 1600 kannað við støði í afturlítandi háttalagi. Spurt verður, hvussu skattur var líknaður, hvussu nógvir skattgjaldarar vóru, hvussu nógv fólk teir umboðaðu, hvat skatturin fór til og hvussu stór byrðan var av kongsskattinum. Tann kongliga umsitingin í 16. øld var komin við Landslógini hjá Magnusi kongi lógbøtara fyri 1280, men keldutilfarið bendir á, at umsitingin ikki var fult skipað við einum løgtingi fyrr enn 1350-1400. Í jarðarbókini frá 1584 fáa vit tað fyrsta yvirlitið yvir ta kongligu skattaskipanina, og í keldunum úr 16. og 17. øld fæst at vita, at skatturin varð nevndur "leding" og harvið goldin í staðin fyri leiðangstænastu. Skattatølini í jarðarbókini benda á, at útgangsstøðið fyri skattaálíkningini var ein uppteljing eina ferð í fortíðini av húsum, sum skuldu hava skattskyldu. Ein samanbering av tí brotakenda keldutilfarinum úr Føroyum úr há- og seinmiðøld við upplýsingar úr øðrum skattlondum í tí norska ríkinum benda á, at henda uppteljing fór fram umleið 1300. Jarðarbókin gevur tí upplýsingar um, hvussu nógvir garðar við skattskyldu vóru í Føroyum í umleið 1300, og eisini, hvar í landinum teir vóru. Kanningin sýnir, at umleið 2.471 fólk búðu í Føroyum, tá ið skattaskipanin kom í lag, og umleið 3.460 fólk í 1584. Tá talið av skattgjaldarum verður samanborið við upplýsingar úr fútaroknskapunum úr 17. øld, fáast ábendingar um, at kongsskatturin, sum teir føroysku skattgjaldararnir guldu, lá millum 4 og 5% av framleiðslu teirra í tíðarskeiðinum millum umleið 1300 og 1600.

**Keywords:** Faroe Islands, Norwegian realm, "skatland", tax-land, tributary land, royal income, tax, royal administration, "sysselmann", "leidang", lawthing, delegates, taxfarmer, taxpayer, assessment-unit, land lease, farm-count, population.

## 1 Inngangur

Í 1271 fór fram ein munandi broyting í stjórnarviðurskiftum føroyinga. Tá komu Føroyar undir norska lóggávu. Broytingin hekk saman við, at tað norska kongsvaldið stovnsfesti seg og virkaði fyri at skipa ríkið sum ein stat við lóggávu, bæði innanlands og í skattlondunum.

Um hetta mundið høvdu føroyingar í meira enn 100 ár verið undir norskum yvirvaldi og goldið norskum valdsharrum skatt. Ta støðuna lesa vit um í Føroyingasøgu frá umleið 1215, har søgan um høvdingadømini í Føroyum í víkingatíðini verður søgd. Eftir øllum at døma við støði í søgn úr Føroyum sigur høvundurin, at eftir at høvdingadømini, sum vóru tvey í tali, vóru sameind í eitt høvdingadømi gjøgnum giftarmál millum Leiv Øssursson og Tóru Sigmundardóttir, gjørdi Leivur avtalu við Magnus kong hin Góða (1035-1047) um at hava Føroyar í len frá honum (sbr. Mortensen, 2019).

Tað at gjalda skatt var í teimum forngermansku samfeløgunum eitt tekin um kúgan. Tað var nakað, sum varð goldið til ein valdsharra, sum hevði vunnið sær yvirvald við tvingsli. Henda hugsjón broyttist við tí kirkjuligu skipanini so hvørt sum vald varð miðsavnað, og ein miðsavnað umsiting varð skipað í nærøkjunum. Um okkara leiðir kom ein tílík umsiting, tá ið kirkjan í tíðini kring 1100 skipaði seg við biskupsdømum. Fyri at

fíggja ta kirkjuligu skipanina varð avtala gjørd millum partarnar í samfelagnum um, at bøndur skuldu lata kirkjuni tíggjund, sum var ein tíggjundapartur av ognini og seinni av framleiðsluni. Í Føroyum varð bispadømi stovnað í umleið 1120, sum var í tíðini hjá Sigurði kongi jorsalafara (1103-1130), og keldurnar siga, at hann innførdi tíggjundina. Søgufrøðingar meta tó, at hon kanska kom so tíðliga, men at tað er sannlíkari, at hon varð innførd í sambandi við stovningina av erkibiskupssetri í Niðarósa í 1152/53.

Í Føroyingasøgu lesa vit, at føroyingar guldu skatt til norskar valdsharrar longu áðrenn 1000. Henda upplýsing er tó ikki álítandi og umboðar heldur støðuna, sum var, tá ið søgan varð skrivað (sbr. Mortensen, 2019). Um søgnin um lenstøkuna hjá Leivi Øssursyni er sonn, er ilt at meta um, og søgufrøðingar vísa tí ikki aftur, hóast teir eisini meta hetta vera ósannlíkt. Men skattland vóru Føroyar, tá Føroyingasøga varð skrivað, og sannlíkast er, at skattlandsstøðan fekk varandi form í fyrru helvt av 1100-talinum, eftir at Føroyar vóru skipaðar sum biskupsdømi. Í samtíðarkeldum síðst úr 1100-árunum fæst nevniliga at vita, at føroyingar guldu "tributt til ávísar tíðir" (Historia Norwegie, 2006: 68), og eisini, at ein sendimaður úr Noregi í hesi tíðini tók sær av kongsins "sýslu" (Sverris saga, kap. 1). Eisini lesa vit í endakapitlinum í Føroyingasøgu (kap. 59), at í samtíðini, tá ið søgan varð skrivað, vóru tað ættarmenn Leivs og Tóru, feðgarnir Einar og Skeggi, sum vóru sýslumenn kongs í Føroyum. Hóast tað er sannlíkt, at júst søgurnar um skattin, sum verða sagdar í Føroyingasøgu, eru tíðarrangar, so er tað týðuligt, at skattur varð goldin í Føroyum í umleið 1200. Søgan bendir eisini á ta fatan, at skatturin varð innkravdur eins og vit lesa í Føroyingasøgu. Høvdingarnir kravdu inn frá bóndum sínum og guldu til ein umboðsmann hjá tí norska valdsharranum, annaðhvørt útsendan ella úr nærøkinum, helst fyri veiting av trygd í handilsviðurskiftum í londum hansara. Hvussu stórur skatturin var, og onnur viðurskifti í sambandi við hann, vita vit tó einki um.

Í keldutilfarinum viðvíkjandi Føroyum hoyra vit einki aftur um skatt fyrr enn í 1500-talinum, og í hesi grein verður spurt, hvørjar ábendingar fáast úr keldutilfarinum úr 1500-talinum og 1600-talinum um kongsskatt og skattaumsiting í Føroyum í hesi tíðini og tíðini frammanundan. Eisini verður spurt, nær skattaskipanin, sum sæst tá, kann vera komin, hvussu skatturin varð líknaður, hvussu nógvir skattgjaldarar og hvussu nógv fólk vóru, hvat skatturin fór til, og hvussu stór byrðan var hjá bóndunum í Føroyum av kongs-skattinum.

Søgufrøðiliga er tað váðaverk at gera niðurstøður úr yngri tíð aftur í eldri tíð. Havandi í huga, at Føroyar ikki vóru tað einasta skattlandið í tí norska ríkinum, kann hetta tó í ávísan mun verða gjørt, serliga tá talan er um skipanarlig viðurskifti. Í ein ávísan mun kann tað brotakenda keldutilfarið úr Føroyum í há- og seinmiðøld verða samanborið við keldutilfarið úr øðrum økjum ella skattlondum í tí norska ríkinum og við niðurstøður, sum søgufrøðingar eru komnir fram til í teimum sambondunum. Eitt nú metti norski søgufrøðingurin, Andreas Holmsen, at modellir, sum eru bygd upp gjøgnum kanning av søguligum viðurskiftum í sama mentanarøki í yngri tíð, kunnu nýtast sum tulkingarkarmar í sambandi við keldur úr eldri tíð. Við íblástri úr tí franska Annales-skúlanum legði hann seg eftir í kanningum sínum av norskari búskaparsøgu at grund-

geva fyri afturlítandi háttalagi. Hann vísti tó á, at tað afturlítandi háttalagið er treytað av, at modellini innihalda algongd virði og spegla eitt nú samfelagsligt framhald (Holmsen, 1976: 46). Júst hetta má ein skattaskipan, og tað, sum hongur uppi í henni, metast at vera. Harumframt hevur granskingin í grannalondunum tey seinastu árini og við støði í samanberandi háttalagi, gjørt munagóð framstig um tilgongdir í tí norska skattlandspolitikkinum. Grannalondini vóru eisini norsk skattlond í há- og seinmiðøld, og eisini har er keldutilfarið brotakent, hóast tað er minni brotakent enn í Føroyum. Henda gransking finst millum annað í ritgerð eftir Randi Bjørshol Wærdahl (2011) og millumtjóða granskingarverkætlanum, sum Steinar Imsen hevur staðið á odda fyri (1990, 1997b, 2010, 2011, 2013, 2018). Tað føroyska keldutilfarið er eisini tikið við í hesar kanningar, men ikki gjølligar kanningar av keldutilfarinum, sum er til umrøðu her. Í viðgerðini niðanfyri fari eg tí at samanbera við hesi úrslit og vísa til tey, eitt nú har tað føroyska keldutilfarið er ov brotakent til at bera sjálvstøðugar niðurstøður.

## 2 Kongsumsitingin

Greiningin av skattaskipanini í Føroyum byrjar við spurninginum um, hvussu tann kongliga umsitingin var skipað, tí ein skattaskipan kravdi umsiting. Umrøðan av sýslumonnum í Føroyum í samtíðarkeldunum frá síðst í 1100-talinum og fyrst í 1200- talinum sipar til tíðina, tá ið tey fyrstu stigini vórðu tikin at skipa eina miðsavnaða kongliga umsiting í tí norska ríkinum. Ta fyrstu tíðina hevur meginuppgávan hjá sýslumonnunum í Føroyum verið avmarkað til umsiting av tributtinum, sum kongur skuldi hava, og neyvan umfatað lóggávuumsiting eins og seinni í 1200-talinum. Hetta kann verða sagt við støði í, at sambært rættarbót Magnusar kongs lógbøtara frá 1271 høvdu føroyingar sína egnu lóggávu heilt fram til tá. Í rættarbótini sigur Magnus kongur seg nevniliga játta bøn føroyinga eftir besta manna ráði, at í Føroyum skuldi sama lóg galda sum í Gulatingsløgum. Tó skuldi búnaðarbólkurin vera soleiðis, sum egna lógbók føroyinga bar boð um (DF, 1985: 24). At meta eftir Føroyingasøgu, hevði heimildarmaður høvundans tíðliga í 1200-talinum góðan kunnleika til norska lóggávu (sbr. Foote, 1970; Mortensen, 2019), og tí er tað sannlíkt, at lóg føroyinga undan 1271 var eftir norskari fyrimynd. Men annars vita vit einki um ta lógina.

Lógin, sum kom í gildi í Føroyum í 1271, var endurskoðanin av Gulatingslógini frá 1267, men av henni er bara kristindómsbólkurin varðveittur. Hans Jacob Debes (1995) metti útsagninirnar hjá kongi um umbøn føroyinga at fáa norska lóg og um ta føroysku lógbókina vera tekin um, at føroyingar stutt undan hesum høvdu játtað kongi lóggávuvald í Føroyum. Undan tí máttu Føroyar tí hava verið eitt sjálvstøðugt land eins og Ísland undan samtykt íslendinga í 1262-64 um at ganga undir tað norska kongsvaldið og gjalda skatt. Henda meting verður mótsvarað av útsøgnini í Historia Norwegie frá 1160-75 um, at føroyingar guldu skatt til ávísar tíðir, og samtíðarkeldum síðst úr 1100- talinum og fyrst í 1200-talinum um sýslumenn í Føroyum. Hon verður heldur ikki góðtikin av søgufrøðingum í dag (Wærdahl, 2011: 62f., 66; Imsen, 2018: 144). Metast má tí, at onkur kollveltandi politiskt hending hevði verið í Føroyum longu í 1100-talinum, sum veitti

heimild fyri, at kongur útinti lóggávuvald í 1271. Eitt kent dømi um eina tílíka politiska hending úr hesi tíðini finst í Sverrissøgu, har Sverri kongur revsaði jallin í Orknoyggjum eftir tann miseydnaða oyggjaskeggjauppreisturin í 1194. Í uppgerðini í 1195 ognaði kongur sær nevniliga garðarnar hjá teimum falnu uppreistrarmonnunum úr Hetlandi og tók sær ræðisrættin, sum jallurin í Orknoyggjum hevði í Hetlandi, bæði av skatti og øðrum skyldum, og eisini rættin til helvtina av sakaroyrunum úr Orknoyggjum og setti sýslumenn at taka sær av hesum (Sverris saga, kap. 125).

Í rættarbótini frá 1271 verður tann kongliga fyrisitingin í landinum eisini nevnd. Umframt ein sýslumann fevndi hon um tveir lensmenn. Hetta sæst í útsøgnini hjá kongi um, at "Eigi wilium vær att syslu madr hefuir fleiri lensmenn end ij" (DF, 1985: 24). Í útsøgnini liggur ein avmarking, men um hon sipar til støðuna, sum longu var, ella um eina avmarking av eini nýggjari støðu, altso eini víðkan av tí kongligu umsitingini, framgongur ikki. Men út frá tí, sum vit annars vita um, hvussu tann kongliga umsitingin í øðrum pørtum í tí norska ríkinum mentist hesa tíðina, er helst talan um tað seinna, altso at tað nú vórðu settir tveir sýslumannshjálparar í tí føroyska skattlandinum, og at teir vórðu nevndir lensmenn.

Gulatingslógin frá 1267 var bert fá ár í gildi í Føroyum, tí sambært rættarbótini til føroyingar frá 1298, nevnd Seyðabrævið, var Landslógin, sum Magnus kongur lógbøtari fekk samtykta á teimum norsku løgtingunum í 1274-76, komin í gildi í Føroyum áðrenn Magnus kongur doyði í 1280 (DF, 1985: 4). Hon fekk gildi í øllum pørtum í ríkinum, men í Íslandi í tillagaðari útgávu. Saman við Hirðlógini, sum skipaði umsitingina hjá teimum ovaru løgunum í tí kongligu umsitingini (sbr. Imsen, 2000), var hon krúnan á verkinum í skipanini av tí stovnsfesta monarkiska statinum í tí norska ríkinum í miðøld (sbr. Imsen, 2018). Landslógin var í gildi í Føroyum fram til 1604, tá Norska lóg hjá Christiani IV kom ístaðin. Hon var ein umseting og víðkan av Landslógini og var í gildi fram til 1687, tá ið Norska lóg hjá Christiani V kom. Eisini í henni ganga fleiri av ásetingunum í Landslógini aftur.

Í Landslógini vóru samstarvsviðurskiftini millum kongsvaldið og bøndurnar skipað. Kongsins umboðsmaður, sum var sýslumaðurin, skuldi tilnevna umboð fyri bøndurnar at vera løgrættumenn, og saman við løgmanni, sum kongur tilnevndi, skuldu teir manna løgrættin á tingi. Løgrætturin var landsins dómstólur. Helst er henda skipan ikki sett í verk beinan vegin í Føroyum, tí at meta eftir Seyðabrævinum var eingin løgmaður í Føroyum í 1298. Ístaðin hevði kongur, til fyriskipan av hesi rættarbótini, sett eina nevnd, sum var mannað við biskupinum í Føroyum og løgmanninum í Hetlandi, at gera lógaruppskotið, sum varð lagt fyri tingið í Føroyum. Eingin sýslumaður verður nevndur í Seyðabrævinum.

Ógreitt er, nær tingið í Føroyum er skipað sum løgting við einum løgrætti eftir Landslógini. Bókin við lógini, sum varð nýtt í Føroyum til umleið 1600, er varðveitt (Kongsbókin, Sth. 33 4°), og málfrøðingar meta hana vera skrivaða í umleið 1300-1325 (Rindal and Spørck, 2018: 27). Men lógskipanin um løn nevndarmanna í Føroyum, sum eisini verður nevnd Skipan um tingfaratoll, er innskrivað seinni, eftir málinum at døma í umleið 1400 ella eitt sindur innan (Helgason, 1951: 107). Í hesi tíðini verður eisini eitt løgting í

Føroyum fyri fyrstu ferð nevnt í keldunum. Í Hundabrævinum, sum eisini er innskrivað í Kongsbókina, vátta bæði løgmaður og løgrættumenn við innsiglum sínum, og hesa innskriving meta málfrøðingar vera frá tíðarskeiðinum 1350-1400 (Helgason, 1951: 111-112). Annars er tað løgskipanin um nevndarmenn í Gulatingsøkinum og samsýningar teirra, sum stendur í tí føroysku lógbókini, og hetta sýnir, at lógbókin upprunaliga er skrivað til nýtslu í Gulatings løgtingsøkinum. Ein onnur ábending um, at nevndarmanna-skipanin ikki kom í lag beinan vegin, er, at innsigli løgrættumanna, sum vit kenna úr tveimum varðveittum stempulmerkjum frá ávikavist 1533 og 1649, sambært bókstavs-forminum verður av serkønum mett at stava úr 1300-talinum (Thiset, 1915). Søgu-frøðiliga má tí verða mett, at løgtingsskipanin í Føroyum, við tilnevndum løgrættu-monnum, sum umboðaðu bøndurnar, í fullan mun er farin at virka í tíðini millum umleið 1350 og 1400. At Landslógin hevur verið í gildi fyri tað, er tó einki at ivast í, tí útsøgnin í Seyðabrævinum um gildiskomuna er greið, og helst hevur kongsvaldið eisini sett ein løgmann at vera dómari í Føroyum skjótt eftir 1298, tí saman við sýslumansembætinum var løgmansembætið sjálv kjarnan í tí staðbundnu stýringini sambært Landslógini.



**Mynd 1**
Innsigli løgrættumanna, sum hongur við einum brævi frá 1533, verður í brævinum nevnt "lannsens insighell". Bókstavsformurin bendir á, at tað er úr 1300-talinum. Hetta vísir, at løgtingið sum stovnur umboðaði Føroyar í ríkisviðurskiftum. (Mynd: Føroya søga 2).

So statt er tað líkt til, at skipanin av tí føroyska samfelagnum eftir Landslógini hevur verið ein tilgongd, sum hevur varað tað mesta av eini øld, frá umleið 1280 til umleið 1350. Úr øðrum pørtum av tí norska ríkinum og øðrum norskum skattlondum vita vit, at meðan teir, ið fingu tillutað sýslumansembæti, vóru limir í kongsins hirð, sum virkaði eftir Hirðskránni, og vanliga vóru aðalsmenn, komu teir, ið vórðu tilnevndir til løgmans-embæti, úr bóndastættini, og tað sama var galdandi fyri teir, ið vórðu tilnevndir at vera løgrættumenn. Í tí norska ríkinum undir Landslógini og Hirðskránni var dómsvaldið tí latið yvir til bóndastættina, meðan ákæruvaldið, sum við lógini gjørdist alment, lá hjá

kongi og hægsta umboðsmanni hansara, sýslumanninum. Framman undan var einki alment ákæruvald, og rættaruppgerðin var privatrættarliga uppgjørd, og í evsta føri politiskt uppgjørd á einum almennum tingi, ella altingi, partanna millum, har tann fjølmentasti parturin var við yvirlutan. Eina tílíka støðu lesa vit um í Føroyingasøgu (kap. 4-5) í uppgerðini millum høvdingarnar Havgrím í Hovi øðrumegin og Brestir og Beinir hinumegin í stríðnum, sum høvundurin legði til grund fyri søgugongdini. Í hesi skipanini hevði ein løgsøgumaður skil á teimum grundleggjandi reglunum, sum vóru samtyktar í rættarsamfelagnum. Í Føroyingasøgu verður ein løgsøgumaður nevndur, sum æt Gilli, og hann verður nevndur í sambandi við tíðina í 1020-árunum.

Eingin løgmaður er kendur í Føroyum undan Símuni løgmanni, sum er nevndur í Hundabrævinum frá 1350-1400. Eftir teir báðar sýslumenninar, sum eru nevndir í enda-kapitlinum í Føroyingasøgu, er heldur eingin sýslumaður kendur fyrr enn í 1388, tá ið aðalsmaðurin Greipur Ívarsson, sum búði í Hattabergi sunnan fyri Bergen, verður nevndur "sýslumaður í Føroyum" (Isl. Ann., 1888: 415; sbr. DF, 1985: 31–35). Eftir 1388 hoyra vit aftur um ein sýslumann í Føroyum í 1437, tá aðalsmaðurin Ámund Sigurðsson Bolt, sum hevði staðið fyri einum miseydnaðum uppreistri ímóti Eiriki av Pommern kongi, sum liður í eini semju millum partarnar fekk Føroyar í len (DN, bd. 2, nr. 727). Síðani kenna vit ikki navnið á nøkrum, ið hevði Føroyar í len, fyrr enn í 1524-25, tá ið Peder Fresenberg, sum helst var úr Hamborg, verður nevndur (StFS, 1908, nr. 16). Kanska Ámund Sigurðsson Bolt eitt stutt skifti búði í Føroyum (Njåstad, 2009), men annars er tað ivasamt, um kongsins hægsti umboðsmaður í hámiðøld og seinmiðøld nakrantíð hevur búð í landinum. Í seinnu helvt av 1400-talinum hava Føroyar helst ligið undir Bergenhus skansa eins og tær viðhvørt gjørdu í 1500-talinum, og vórðu stýrdar av fútum haðani. Fútarnir tóku sær av uppgávunum, sum sýslumaðurin ella høvuðsmaðurin á Bergenhus skansa formliga høvdu evstu ábyrgd av.

Fútin var so statt hægsti umboðsmaður kongs, sum búði í landinum. Viðhvørt var hann settur av kongi, og viðhvørt av honum, sum hevði landið í len, vita vit úr keldum úr 1500-talinum. Fútin umsat heimildirnar, sum kongur hevði latið við leninum, og hevði eisini ábyrgd av kongsins leigugørðum og innkrevjing av leigugjøldunum, sakaroyrum (bótum), skatti, tolli og øðrum inntøkum, sum kongur sambært samtykt frá bóndunum átti rætt til. Eisini hevði hann ábyrgd av, at rætt varð farið fram í handilsskapi, og at lóg og rættur vórðu hildin og rættvíst umsitin. Fútin umsat so statt tað almenna ákæruvaldið í landinum. Í 1500-talinum skuldi hann eisini standa fyri kongsins stuðli til skúlaskap og hospital (sbr. StFS, 1908, nr. 16, 17, 37, 46, 48, 54, 92, 94, 111, 178, 187, 192, 215, 228, 231, 232), sum fyri trúbótina høvdu ligið hjá kirkjuni. Fútin umboðaði sostatt tey yvir-skipaðu áhugamálini hjá kongi, og í 1500-talinum og 1600-talinum vóru fútarnir ongan-tíð føroyingar.

Løgmaður var eisini settur av kongi, men hann var, tað vit vita, vanliga føroyingur. Høvuðsuppgáva løgmans var at vera dómari, og aftur at sær í hesum starvinum hevði hann løgrættumenninar, sum vóru dómsmenn (StFS, 1908, nr. 136, 173, 191). Løgmaður hevði lógbókina og landsins innsigli, innsigli løgrættumanna, í varðveitslu. Mál, sum

løgrætturin dømdi, kundu í 1500-talinum skjótast inn fyri ein løgmann í Noregi ella inn fyri kong (StFS, 1908, nr. 65, 191, 234, 235), og soleiðis hevur tað helst eisini verið í eldri tíð. Eisini sæst í tingbókunum úr 1600-talinum, at tað var ein týðandi uppgáva hjá løgmanni at hava eftirlit við, at handilsskapurin hjá keypmonnunum, sum høvdu handilsloyvi frá kongi, var reiðiligur, tá ið tað snúði seg um mál, vekt og vørutakst (sí t.d. Tingbók, 1978: 143, 155). Áseting um hetta stendur eisini í Landslógini (ML, 1915, VIII: 29; Kongsbókin, 68r). Løgmaður og løgrættumenn umboðaðu so statt áhugamálini hjá almúguni.

Undir hesi skipan var tann kongliga umsitingin eisini skipað við einum innaneftirliti. Av skjølunum úr 1500-talinum og 1600-talinum sæst nevniliga, at almúgan eisini hevði atgongd til at klaga beinleiðis til kong (StFS, 1908, nr. 37, 94, 106, 115, 116, 118, 119, 120, 128, 134, 172, 176, 215, 228). Eitt nú í 1567, tá ið klagað varð um, at løgtingið dømdi fútanum til vildar. Tað hevði við sær, at kongur árið eftir víðkaði umsitingina við einum skrivara, sum skuldi taka ímóti klagum og skriva niður avgerðir, sum vóru tiknar á tingi (StFS, 1908, nr. 115, 116, 119, 120).

Hvussu nærøkisfyrisitingin var skipað, fæst innlit í í tingbókini frá 1655. Har er tað fremst innskrivað ein siðbundin tala, sum løgmaður las, tá ið løgtingið varð sett. Í henni verður sagt frá tingskipanini úr gamlari tíð, millum annað, at 36 eiðsvornir nevndarmenn sótu í løgrættinum, og eisini, hvussu teir vóru tilnevndir. Teir vórðu tilnevndir av kongsins umboðsmanni ella fúta hansara "hiemme vdi hans Schibsreede, I hans Leen, paa Det Thing, som holdis om Midfaaste Thide", tvs. á vártingi (Tingbók, 1958: 12–13). Hetta brotið finst eisini í norsku lóg hjá Christiani IV, sum hevur tað úr Landslógini. Í kapitlinum í Landslógini um eið løgrættumanna, sum eisini fyriskipar, at 36 mans skuldu sita í løgrættinum, verður ásett, at teir skuldu vera skikkaðir til starvið og kosnir soleiðis, at eitt umboð var úr hvørjum fylki (ML, 1915, I: 3; Kongsbókin, 3v).

Hugtakið *skipsreiða* í taluni bendir á ta fatan í Føroyum í 1600-talinum, at skipanin við einum løgtingi var knýtt at eini leiðangsskipan. Leiðangur var í sínum uppruna ein sjóhernaðarlig verjuskipan í Noregi úr víkingatíð, sum var grundað á avtalur millum bøndur og kongsvald um hertænastu eina tíð av árinum, um tørvur var á tí. Skipsreiðin var tað økið, sum í felag átti og útgjørdi eitt skip til hesa verjutænastu. Úr hinum skattlondunum eru ikki varðveitt tekin um, at leiðangsskipanin í Landslógini varð sett í verk, og tað hevur fingið Steinar Imsen (2018: 150) til at taka samanum, at hetta helst er "tað stóra felags undantakið" fyri, at Landslógin varð sett í gildi í øllum tí norska ríkinum. Men í Føroyum finnast altso seinni og brotakendar ábendingar um, at uppbýtið av landinum upprunaliga var grundað í eini skipan av landsverju. Orðið *len* í taluni sipar til sýslurnar í 1600-talinum og seinni, sum vóru embætisøki hjá hjálparmonnum fútans, sum í hesi tíðini nevndust sýslumenn. Í 1500-talinum vórðu teir eisini nevndir lensmenn (StFS, 1908, nr. 126), sum eisini er tað heitið, sum í rættarbótini frá 1271 verður nýtt um hjálparmenn sýslumansins, sum hevði landið í len. Í Íslandi vórðu teir nevndir sóknarmenn. Sýslumansheitið í seinni tíð hevði tí ikki sama týdning í 1200- og 1300-talinum sum seinni. Leiðangurin í Noregi misti sín týdning sum sjóhernaðarlig fyriskipan tíðliga

í 1400-talinum, men helt fram, eins og eisini hevði verið vanligt síðan 1200-talið, sum ein skattaskipan.

Sum hjálparmenn fútans tóku sýslumenninir sær av uppgávunum, sum fútin varðaði av, í embætisøkjum teirra, eitt nú tí almenna ákærumyndugleikanum (sbr. StFS, 1908, nr. 70). Teir høvdu eitt slag av politimyndugleika, eins og tað sæst í einum máli í tingbókini frá 1617, har sýslumaðurin varð tilkallaður í sambandi við eitt drápsmál (Tingbók, 1978: 48). Helst hevur tað eisini verið uppgáva teirra, fútans vegna, at tilnevna teir seks nevndarmenninar, sum úr sýsluni skuldu møta í løgrættinum á løgtingi at vera dómsmenn. Nær henda skipanin við uppbýti av landinum í sýslur er komin, vita vit ikki, men í einum skjali frá 1407, har ein sýslumaður í Suðuroy verður nevndur (DF, 1985: 48), sæst, at skipanin var komin fyri tað. Í tingbókunum úr 1600-talinum sæst, at teir staðbundnu sýslumenninir eisini vóru løgrættumenn og komu úr bóndastættini. Umframt at umboða ákæruvaldið vóru teir so statt eisini meddómarar hjá løgmanni. Hetta var tó ein leiklutur, sum teir fingu undir stýrinum hjá Christiani III kongi (1534-1559) beint eftir trúbótina (Imsen, 1997: 22–23). Av øðrum tóku teir sær av teimum fíggjarligu uppgávunum, sum kongsins umboðsmaður (sýslumaðurin, lensharrin) ella fútin formliga hevði í landinum.

Tann kongliga umsitingin í Føroyum, sum sæst í keldunum úr 1400-talinum, 1500-talinum og 1600-talinum, við einum løgtingi og seks vártingum, tykist soleiðis at vera byrjað sum ein verjufelagsskapur, sum eisini fevndi um eina rættarskipan, har umboð fyri kongsmyndugleikan og bøndurnar samstarvaðu um ábyrgdarbýtið. Hetta grundmynstrið við samstarvi millum kongsmyndugleika og bøndur, sum sæst í keldutilfarinum úr 1500-talinum og 1600-talinum, eyðkendi eisini umsitingar í øðrum landspørtum og skattlondum í tí norska ríkinum longu í 1200-talinum og 1300-talinum. Hugsjónarliga var tað grundað í tí kristnu læruni um *rex iustus*, sum var ein fyrimynd um tann friðarskapandi og rættvísa kongin, sum eisini var bindiliður millum kirkjuna og fólkið. Í Noregi festi hugsjónin røtur í 1200-talinum og gjørdist tann grundleggjandi liðurin í menningini av ríkisvaldi undir Hákuni kongi Hákunssyni (1217-1263). Við støði í hesum eydnaðist tað kongsvaldinum at menna eina miðsavnaða stýring av tí víðfevnda ríkinum gjøgnum skynsamt samstarv við bøndurnar. Tað kongliga stýrið varðveitti sítt løggildi júst í hesum, at landsins íbúgvar í stóran mun ráddu sær sjálvum innan teir lógarkarmar, sum kongsvaldið hevði givið við Landslógini, og bøndurnir høvdu samtykt á tingunum.

Samanumtikið var tann kongliga umsitingin so statt skipað gjøgnum samtyktir millum kongsvald og bøndur á tingi um samstarv. Sambært tí føroyska keldutilfarinum var umsitingin mannað við einum aðalsmanni, sum hevði landið í len og ikki búði í landinum, einum fúta fyri hann, sum búði í landinum, seks lensmonnum, sum eisini vórðu nevndir sýslumenn, einum løgmanni og 36 nevndarmonnum, sum mannaðu løgrættin. Í 1568 varð umsitingin víðkað við einum skrivara.

## 3 Kongsinntøkur og skattur í 1500-talinum

Ein annar partur av spurninginum um skatt er, hvørjar kongsinntøkurnar vóru, og hvat tær gingu til. Í keldunum úr 1500-talinum sæst, at tær kongligu inntøkurnar av Føroyum vórðu nevndar landskuld, sakaroyru, tollur, skattur og landahjálp, sum eisini var ein skattur. Landskuldin verður í keldunum eisini nevnd renta, og hon var rentuinntøkan, sum kongur hevði av at leiga jørð, sum hann átti, út. Sambært jarðarbókini frá 1584, sum er tann elsta jarðarbókin, sum er varðveitt í Føroyum, var rentuinntøkan hjá kongi hetta árið 1.566 gyllin.[1] Tá er rentan av pantsettum gørðum ikki tikin við. Í jarðarbókini sæst, at hann tá átti 53% av jarðarvirðunum í Føroyum; men sambært lensgjaldinum hjá lensharranum í tíðini 1547-1553 átti hann 5% av jarðarvirðunum fyri trúbótina, og kirkjan 48% (sbr. StFS, 1908, nr. 54, 55, 56, 59, 61, 67, 68, 78; Degn, 1933).[2] Í sambandi við ognarumsitingina hevði kongur eisini inntøku av festigjøldum, sum vóru umleið 173 gyllin um árið eftir trúbótina.[3] Fyri trúbótina átti kirkjan, sum sambært lensavtaluni í 1547 átti 90% av jørðini, sum kongur seinni átti, meginpartin av hesum.

Sakaroyru, tollur og skattur vóru kongsrættindi og verða í keldunum nevnd *regales*. Sakaroyru vóru bøturnar, sum kongur skuldi hava sambært ásetingunum í Landslógini fyri lógarbrot. Sambært tingbókunum úr tíðarskeiðinum 1615-1688 vóru bøturnar í miðal 112 gyllin um árið. Av teimum vóru 77 gyllin í miðal um árið fyri siðamisbrot, og 35 gyllin í miðal um árið fyri onnur misbrot. Siðamisbrot vórðu dømd eftir *Stóradómi*, sum tað íslendska altingið samtykti í 1564 og kongur staðfesti sum lóg í 1565; men fyri trúbótina vóru siðamisbrot dømd eftir kristinrættinum, har biskupur fekk meginpartin av inntøkunum.

[1]Av rentuinntøkunum vóru 642 gyllin fyri jarðarleigu, 743 gyllin fyri seyðaleigu, 173 gyllin fyri neytaleigu, 7 gyllin fyri rossaleigu og 1 gyllin fyri aðra leigu.

[2]Leigujørðin hjá kongi verður í jarðarbókini uppgjørd eftir markatalinum. Samanlagt vísur jarðarbókin, at kongsjørðin í 1584 var 1.258 merkur og 162 alin. Í seinni tíð hevur tann almenna uppgerðin av tí samlaða jarðarvirðinum í Føroyum, har bæði kongsjørð og óðalsjørð eru við, verið uppgjørd eftir tí rhínska peninga-virðinum, gyllin, sum varð innført undir Christiani II í 1513 (Jensen, 1976), til 2.368 merkur 9 gyllin og 16 skinn (Thorsteinsson, 1981: 671). Eftir tí gomlu skipanini svaraði tað til 2.368 merkur og 196 alin.

[3]Inntøkur av festigjøldum høvdu øll, sum leigaðu jørð út, bæði kongur, kirkjan og aðrir jarðareigarar. Eftir Landslógini vórðu festigarðar útleigaðir triðjahvørt ár (ML, 1915, VII: 1,2), og tá varð festigjald goldið. Hetta broyttist við tíðini soleiðis, at garðarnir í seinmiðøld vórðu festir fyri lívstíð, har festigjald varð goldið eina ferð, og ein minni upphædd, sum varð nevnd *ágáva* ella *triðjaárstøka*, varð goldin triðjahvørt ár (Bjørkvik, 1982a: 412). Síðst í 1500-talinum var festigjaldið eina gyllin fyri hvørja mørk (Zachariassen, 1961: 101), og ágávan eina hálva gyllin fyri hvørja mørk (Degn, 1945: 2 (inngangur)). Um roknað verður við, at festigjald av einum garði í miðal varð goldið tjúgunda hvørt ár, og ágáva triðjahvørt ár, verður við støði í festigarðatalinum í jarðarbókini frá 1584 komið fram til, at festigjøldini vóru 63 gyllin í miðal um árið, og ágávan 210 gyllin í miðal um árið. Sambært Louis Zachariassen (1961: 111) var inntøkan fyri landskuld tey árini, ágava kann staðfestast í fútaroknskapunum úr 1600-talinum, tætt við 500 gyllin størri enn vanligt.

Tollur var avgjøldini, sum handilsmenn vóru kravdir eftir í sambandi við innflutning og útflutning av vøru. Tollur var so statt inntøkan, sum kongur fekk av handlinum, um hann ikki rak hann sjálvur. Eitt nú verður *sisegjald* nevnt í 1535 (StFS, 1908, nr. 48), sum var eitt avgjald fyri innflutning av víni, sum longu tykist at vera komið í 1302 (Blom, 1982). Vit vita tó ikki, hvussu nógv kom inn í tolli í Føroyum.

Skattur var eitt fast avgjald, sum varð goldið eina ferð um árið, meðan landahjálp var ein serskattur, og í báðum førum kravdist heimild. Landahjálp kenna vit í norskum sambandi serliga úr fíggjarpolitikkinum hjá Christiani II í 1515, 1517 og 1519, tá manntalslistar vórðu gjørdir fyri at líkna hana, men eisini seinni (Bjørkvik, 1982b). Í keldutilfari, har Føroyar verða nevndar, er hesin skattur umrøddur í 1534-35 (StFS, 1908, nr. 43, 44, 45) og 1559-60 (StFS, 1908, nr. 91, 95), og báðar ferðir var hann tveir dálar fyri hvønn skattgjaldara. Í skattabrævinum frá 1560, sum eisini varð sent til Føroya, verður upphæddin útgreinað soleiðis, at hvørjir 10 kongsbøndur og aðrir leigulendingar samhaldsfast skuldu rinda 10 dálar, har "den rige hjælpe den fattige", eins og tað stendur, meðan ognarbøndur á sama hátt skuldu gjalda 20 dálar fyri hvørjar 10 bøndur. Í skattabrøvunum, sum vórðu send um alt ríkið, eru útgreiningar eisini um útgerðarmenn, fiskimenn, skiparar og kirkjumenn. Í 1563 varð eitt einsljóðandi skattabræv sent til Føroya, men ta ferðina sendu føroyingar kongi bønarbræv um at sleppa teimum undan serskattinum, og í svarskrivinum frá 1565 játtaði kongur fyri hesa ferð (StFS, 1908, nr. 100, 106). Í brøvunum, sum í 1534 og 1535 vórðu send Føroya biskupi, løgmanni og almúgu, verður gjølla útgreinað, at heimildargrundarlagið fyri landahjálpini var ein samtykt á løgtingi í Føroyum í 1533, sum hann, ið hevði Føroyar í len, hevði "úttingað" ella fingið samtykta á tingi (StFS, 1908, nr. 42, s. 45; nr. 45, s. 49). Líknandi dømi finnast eisini í norskum keldutilfari undan trúbótini. Men eftir statsrætti í seinmiðøld hevði tað norska ríkisráðið, har millum annað Føroya biskupur í seinmiðøld hevði sæti, formliga eisini heimild at játta kongi serskatt fólksins vegna. Í tí norska ríkinum fall "tingingin" við fólkið tó so hvørt burtur, og tá ið einaveldið varð innført í 1660, misti eisini ríkisráðið játtanarrættin (Holmsen, 1976: 34–35). At meta eftir orðingunum í fylgiskrivinum til skattabrævið frá 1563 og svarskrivinum frá 1565 til bønarbrævið frá føroyingum um at sleppa sær undan serskattinum frá 1563, hevði løgtingið ikki samtykt hann (sbr. StFS, 1908, nr. 100, 106).

Fyri trúbótina luttók løgtingið í tí føroyska skattlandinum so statt í skattaumsitingini. Tað er týðuligt, at hetta var eftir gomlum rættarsiði, og at kongsvaldið var tilvitað um, at staðbundin politisk undirtøka var neyðug, tá ið skattur var álagdur.

Tann fasti skatturin verður í keldunum úr 1500-talinum eisini nevndur *leding* (StFS, 1908, nr. 46, 91, 99, 228, 231), og heitið sipar til leiðangsskipanina í miðøld. Hetta sýnir, at skatturin hevur verið heimilaður í 1. kapitli í landsverjubólkinum í Landslógini um avloysing fyri leiðangstænastu (ML, 1915, III:1; Kongsbókin, 12r). Hetta sæst eisini í einum dómi í tingbókini frá 1660 um skattaeftirstøðu, har tað verður víst til ásetingarnar í 1. kapitli í landsleigubólkinum í Norsku lóg hjá Christiani IV (sbr. Tingbók, 1958: 180–181), sum eru úr Landslógini.

**Talva 1**
Skattur, hús og familjuuppihaldarar í 1584, skipað eftir sýslum.

| Sýsla | Skattur, gn | Hús (garðar) | Familjuuppihaldarar |
|---|---|---|---|
| Suðuroyar sýsla | 64,15 | 73 | 100 |
| Sandoyar sýsla | 43,40 | 51 | 68 |
| Vága sýsla | 29,00 | 40 | 50 |
| Streymoyar sýsla | 72,18 | 102 | 117 |
| Eysturoyar sýsla | 69,50 | 101 | 121 |
| Norðoya sýsla | 52,90 | 60 | 76 |
| Føroyar til samans | 331,13 | 427 | 532 |

Brotpartar av virðiseindini gyllin (gn), sum í jarðarbókini eru uppgivin í skinnum, eru her umroknaðir til desimalar.

Í 1. kapitli í landsverjubólkinum í Landslógini verður ásett, at har, sum leiðangstænasta varð latin, skuldi kongur í friðartíð ikki krevja meira í skatti enn helvtina av tí virðinum, sum var avtalað við fullum leiðangsútboði, uttan so, at "so stór neyð rakar, at menn, um teir kenna kongsins miskunn og góðvilja, vilja lata meira orsaka av kærleika til hansara." (ML, 1915, III:1,3; Kongsbókin, 12r). Ivaleyst er tað hesi lógarreglu um undantak, sum teir donsku kongarnir, Christian II og Christian III, hava styðjað seg til við serskattum sínum beint undan trúbótini. Síðani verður ásett í Landslógini, at "Eingi almenn avgjøld skulu kongur ella umboðsmenn hansara leggja á okkum, hvørki gávur ella veitslur ella hestafóður ella viðarhøgging har sum leiðangur verður gjørdur, uttan skjúts og tær lýðskyldur, sum standa í lógbókini. " (ML, 1915, III: 1,4; Kongsbókin, 12r). Orðið lýðskylda hevði somu merking sum tegnskylda, tvs. skyldan, sum bøndurnir í ríkinum sambært samtykt høvdu mótvegis kongsvaldinum. Sambært lógini, og at meta eftir útinningini av serskattinum í 1500-talinum, hava føroyingar tí gjøgnum tíðina, tað vit vita, ikki havt aðrar skattaskyldur enn hesar báðar, og so onkrar smærri skyldur, sum verða nevndar í Landslógini, eitt nú skjútsskyldu, sum hevur verið framd fram til nýtíð. Í Føroyum varð skjútsskyldan tikin av í 1922, og skyldan at skjútsa prest í 1936. Hvussu stórt tað virðið var, sum leiðangstænastan í friðartíð kundi avloysast við, framgongur tó ikki av Landslógini, men einans, at tað fulla virðið í ófriðartíð fevndi um manning, skip og vápn eftir nærri avtalu, og eisini, at henda veiting eisini fevndi um skattlondini, um tey vórðu álopin (ML, 1915, III:3,1; Kongsbókin, 13r).

Í jarðarbókini frá 1584 sæst, at tann fasti skatturin, ella leiðangsskatturin, av Føroyum, var til samans 331 gyllin. Skatturin var líknaður millum 427 garðar við 532 familjuuppihaldarum. Í talvu 1 eru hesi tøl útgreinað eftir sýslum.

Eitt gjald, sum landsins bøndur eisini skuldu rinda, var løn til nevndarmenn á løgtingi. Jakob Jakobsen (DF, 1985: 27–28) nevndi skipanina um hetta, sum umleið 1350-1400 varð innskrivað í Kongsbókina, fyri *skipan um tingfaratoll* av tí, at í tekstinum verða gjøldini nevnd *ting fara tollur*, men í grundini er talan um eina skipan um samsýningar

(sbr. Weyhe, 2012). Sambært Landslógini var tað løgmaður, sum umsat hana, men kostnaðin av hesi skipan vendi eg aftur til seinni.

Samanumtikið sýnir tað føroyska keldutilfarið, at skattur kravdi lógarheimild, og at løgtingið í tíðini kring trúbótina luttók í tí yvirskipaðu skattaumsitingini eftir gomlum rættarsiði, har kongsvaldið var tilvitað um, at staðbundin politisk undirtøka var neyðug, tá ið skattur var álagdur. Eisini sæst í keldutilfarinum, at løgtingið ikki einans var ein dómstólur, men hevði eisini politiskar uppgávur, bæði í sambandi við umboðanina út eftir og ta kongligu skattaskipanina í landinum.

## 4 Líkningin í 1584

Hvussu varð skatturin í 1584 líknaður? Í jarðarbókini frá 1584 sæst, at øll guldu ikki eins nógv í skatti, og at samband var ikki millum, hvussu nógva jørð, hvør garður hevði, og hvussu nógv teir guldu í skatti. Av tí at skatturin ikki sær út til vera líknaður í mun til fíggjarligar umstøður, hava frøðingar mett, at skatturin var ein koppskattur ella persónsskattur (Arnbjørn Mortensen, 1954; Thorsteinsson, 1981, 1991, 2008). Við atliti at hesum hevur Arne Thorsteinsson (1981: 675–676) eisini sett fram eina tilgiting um, at skatturin upprunaliga var ein persónsskattur, sum seinni varð førdur yvir á byggigrundir bóndanna, og at skatturin, so hvørt sum garðarnir vórðu býttir gjøgnum arvaskifti, í teimum flestu førunum er vorðin hangandi við grundirnar hjá tí upprunaliga garðinum. Henda tilgiting er tó ikki váttað.

Spurt kann tí verða, hvørjar ábendingar keldutilfarið gevur um, hvussu líkning av skatti fór fram í 1584? Í jarðarbókini sjálvari er tað týðuligt, at tað vóru garðar ella hús, har annaðhvørt ein ella fleiri familjuuppihaldarar búðu, sum vóru líkningareindir. Í jarðarbókini eru upp í sjey familjuuppihaldarar skrásettir í eini líkningareind. Í jarðarbókini sæst eisini, at av teimum 427 líkningareindunum guldu 397 garðar ella hús (92%) skatt, meðan 30 garðar ella hús (8%) ikki guldu skatt. Tey vóru hospitalið, løgmansgarðurin og embætisgarðar hjá prósti og prestum.

Tað vóru so statt hesar 397 líkningareindirnar, sum guldu tær 331 gyllinirnar í skatti í 1584. Verður hetta kannað nærri, sæst í jarðarbókini, at 54% av teimum guldu eina gylin í skatti, meðan 38% guldu minni enn eina gyllin og 8% meira enn eina gyllin. Ein gyllin í skatti tykist tí at hava verið ein grunduppphædd. Í talvu 2 sæst talið á líkningareindunum við skatti, familjuuppihaldarum í teimum og hvussu nógv tær guldu í skatti. Í talvu 3 sæst, hvussu nógvar líkningareindir høvdu ein ella fleiri upphaldarar, sum guldu ávikavist minni enn eina gyllin, eina gyllin og meira enn eina gyllin í skatti.

Meðan skatturin varð heimilaður í landsverjubólkinum í Landslógini, so er landsleigubólkurin (búnaðarbólkurin í Kongsbókini) at meta sum eitt slag av skattalóg, og líkningarstøðuna í 1584, sum sæst í talvu 3, finna vit aftur í honum. Í landsleigubólkinum verður skipað, hvussu farast skuldi fram í sambandi við leigumál, sama um tað var kongur, kirkjan ella onkur annar, sum leigaði jarðarogn sína út, og eisini, hvussu farast skuldi fram í sambandi við ivamál, millum annað viðvíkjandi skatti. Í fyrsta kapitli verður fyriskipað, hvørji grundleggjandi rættindi partarnir høvdu sínámillum, og síðani verður í lógini

**Talva 2**
Tal á líkningareindunum við skatti, familjuuppihaldarum í teimum og hvussu nógv tær guldu í skatti.

| Sýsla | Líkningareindir við skatti | Upphaldarar | Skattur tils., gn |
|---|---|---|---|
| Suðuroyar sýsla | 71 | 94 | 64,2 |
| Sandoyar sýsla | 50 | 67 | 43,4 |
| Vága sýsla | 37 | 47 | 29,0 |
| Streymoyar sýsla | 95 | 111 | 72,2 |
| Eysturoyar sýsla | 89 | 109 | 69,5 |
| Norðoya sýsla | 55 | 71 | 52,9 |
| Til samans | 397 | 499 | 331,1 |

**Talva 3**
Líkningareindir við einum ella fleiri uppihaldarum, sum guldu ávikavist minni enn eina gyllin, eina gyllin og meira enn eina gyllin í skatti.

| Sýsla | 1 uppih. og <1 gn í skatti | 1 uppih. og 1 gn í skatti | 1 uppih. og >1 gn í skatti | 2-7 uppih. og <1 gn í skatti | 2-7 uppih. og 1 gn í skatti | 2-7 uppih. og >1 gn í skatti |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Suðuroyar sýsla | 15 | 45 | 0 | 2 | 5 | 4 |
| Sandoyar sýsla | 15 | 22 | 1 | 0 | 10 | 2 |
| Vága sýsla | 14 | 12 | 1 | 5 | 2 | 3 |
| Streymoyar sýsla | 42 | 37 | 6 | 1 | 6 | 3 |
| Eysturoyar sýsla | 38 | 36 | 2 | 3 | 7 | 3 |
| Norðoya sýsla | 13 | 32 | 2 | 1 | 1 | 6 |
| Til samans | 137 | 184 | 12 | 12 | 31 | 21 |

útgreinað í 63 øðrum kapitlum, hvussu farast skuldi fram í ivamálum, ella tá ið ósemjur stóðust. Fyrisitingin av hesum varð løgd til staðbundnar nevndir við seks skynsomum monnum, sum skuldu gera meting í tílíkum málum (sbr. ML, 1915, VII, kap. 2, 3, 4, 9, 12, 13, 15, 17, 20, 21, 24, 27, 28, 31, 32, 33, 37, 39, 42, 43, 48, 49, 50, 53, 58, 62, 64). Steinar Imsen (1990) hevur víst á, at hesar nevndirnar vóru tann grundleggjandi liðurin í tí rættarsamfelagnum, sum eyðkendi stýringina av landspørtunum í tí norska ríkinum í nærøkjunum. Spurningurin er tí, um hetta sæst aftur í líkningini í 1584?

Støðan í jarðarbókini sæst aftur í 15. kapitli í landsleigubólkinum. Har verður fyriskipað í sambandi við nýtslurætt av tilfeingi, tá ið leigulendingaskifti var, at "um fleiri menn búgva í húsum saman enn ein, líka mikið hvussu teir skifta húsini, hava teir líka rætt til allar tær dyr, sum óskiftar eru. Men um hann høggur fleiri dyr í húsini enn tað vóru, tá hann kom til, skal hann gjalda eina mørk í silvuri, kongi helvtina og tí, sum átti húsini, helvtina, og bøta skaðan á húsini eftir tí, sum skynsamir menn meta." (ML, 1915, VII: 15.1; Kongsbókin, 45v-46r).

Víðari verður soleiðis ásett í sama kapitli: "Nú koma ikki allir leigulendingar til jarðirnar í senn, tá skal hann krevja skifti, sum vil hava, við tveimum vitnum, um jørðin er óbygd ella hann ikki er komin, sum leigar jørðina. Tá málar hann sær ein eins stóran teig og eins væl tæddan, og síðan gera teir sum teir vilja, um teir kasta lut ella hvør tekur tann teigin, sum hann hevur taðað. Leigulendingaskifti verður altíð hildið, meðan ein av teimum býr á jørðini. Men um ein fer burtur av jørð síni, skal tann, sum kemur til, hava teigarnar og húsini, sum hin hevði, sum flutti burtur, og hvør kann síðan njóta sín búskap. Jørðin skal skiftast soleiðis, at allir hava teigar javnt breiðar og javnt langar og javnt góðar eftir jarðarleiguni. Men um ein hevur breiðari teig ella longri, skal hann lata ganga frá av sínum akri, til tann, sum hevur minni. Hann skal lata bæði av sáddum og ósáddum akri og einki hava fyri starv sítt. Men um hann ikki vil lata av, tá kann leigulendingur krevja tað sum kunnig skuld." (ML, 1915, VII: 15.3; Kongsbókin, 46r).

Hesi brotini lýsa rættarstøðurnar í sambandi við kongsskatt hjá teimum føroysku húshaldunum í 1584, sum guldu minni ella meira enn eina gyllin í skatti. Út frá hesum kunnu vit meta, at um eini hús, har fleiri familjur búðu, vóru óskift, so svaraðu familjurnar samhaldsfast fyri skyldum sínum. Men um húsið fór sundur í fleiri hús, skuldi ein staðbundin metingarnevnd virðismeta skyldurnar av nýggjum. Í tí øvutu støðuni, at hús løgdu saman, t.d. í sambandi við arvaskifti ella keyp av jørð í somu búseting, kunnu vit meta, at farið varð fram á sama hátt við máling av tilhoyrandi teigum og nýggjari virðismeting. Í tingbókunum úr 1600-talinum síggjast tvey dømi um hetta. Eitt dømi um eina almenna virðismeting í sambandi við jørð, sum endaði í løgtinginum, sæst í tingbókini frá 1617 (Tingbók, 1953: 51), og eitt annað dømi sæst í tingbókini frá 1647-48, har tað vóru sýslumaðurin og løgrættumenninir í Suðuroy, sum stóðu fyri metingini (Tingbók, 1953: 376–379; sbr. Zachariassen, 1961: 343).

Í kap. 53 í landsleigubólkinum eru ásetingar um, hvussu farast skuldi fram, tá ið talan var um nýbygging, og her verður leiðangsskattur beinleiðis nevndur: "Nú verður rudd-

staður bygdur í heraðinum ella í almenningi, tá skal tann, sum ruddar, hava hann frían fyri leigu og leiðang í tríggjar vetrar, og ikki hava skyldu til boðbering ella at flyta fátækrafólk. Men tá tríggir vetrar eru lidnir, skulu seks skynsamir menn meta um, hvat ruddstaðurin kann bera í leigu ella leiðangi." (ML, 1915, VII: 53.1; Kongsbókin, 57r).

Av lógarásetingunum skilst, at ein líkning skuldi fara fram, tá ið húshaldini broyttust, í mun til dyrkilendi teirra, og eisini, at ein líkning skuldi fara fram í sambandi við bygging í nýruddaðum almenningi ella í bygdini. Henda líkning tykist soleiðis at vera gjørd við støði í eini grundupphædd í skattinum, og tilíkar umlíkningar síggjast í fleiri førum at vera farnar fram, tá ið jarðarbøkur úr 1600-talinum verða samanbornar (sí t.d. Degn, 1945: 93, 100, 166, 176, 186, 193, 197, 213, 235).

Oman fyri varð víst á, at tað í tí føroyska keldutilfarinum úr 1500-talinum og 1600-talinum sæst, at tann kongliga fyrisitingin í nærøkjunum varð mannað av seksmanna-nevndum. Sýslumaðurin, sjálvur sætti, tilnevndi hinar, og í løgtinginum sótu teir allir sum dómsmenn hjá løgmanni í løgrættinum. Leiklutin at vera dómsmenn høvdu teir stað-bundnu sýslumenninir tó neyvan í seinmiðøld, og helst hava aðrir verið dómsmenn fyri teir. Oman fyri varð eisini víst á, at tað í landsleigubólkinum í Landslógini fleiri staðni verður ásett, at tá ið ivamál ella ósemjur stóðust í leigumálum, sama um tað var kongur, biskupur ella onkur annar, sum leigaði ogn sína út, skuldi ein nevnd við seks skyn-somum monnum gera eina meting í málinum. Eisini skuldi ein seksmannanevnd sambært lógini gera eina meting, um ein ruddstaður toldi leigu ella leiðang. Hesi mál hava helst verið avgreidd fyrisitingarliga í nærøkjunum, eins og lógin leggur upp til, tí tey síggjast ikki í tingbókunum uttan í teimum báðum førunum frá 1617 og 1647-48, har málini endaðu í løgtinginum. Í teimum fyrisitingarligu málunum hava tað tí verið nevndarmenninir í sýsluni, sum hava mannað nevndirnar, sum Landslógin fyriskipar í leigu- og líkningarmálum, eins og tað framgongur úr tingmálinum frá 1647-48.

Tað sæst soleiðis eitt týðuligt samband millum líkningarstøðuna í 1584, upplýsingar-nar í tingbókunum úr 1600-talinum og ásetingarnar í Landslógini, sum kom í gildi í Føroy-um fyri 1280. Tað kann rímiliga verða mett, at bøndurnir luttóku í líkningini av skatti gjøgnum nevndarmenninar, sum umboðaðu teir á løgtingi. Hvør grundupphæddin var, framgongur av jarðarbókini. Í talvu 3 sæst nevniliga, at av teimum 397 líkningar-eindunum, sum guldu skatt, guldu 215 líkningareindir (54%) eina gyllin í skatti. Hetta bendir á, at útgangsstøðið fyri skattalíkningini var ein uppteljing eina ferð í fortíðini av húsum, sum skuldu hava skattskyldu, og hvørt hús var líknað við grundupphæddini, sum seinni hevði eitt virði upp á eina gyllin.

## 5 Húsateljing í fortíðini

Grundað á at skattur varð líknaður við støði í eini grundupphædd, sum í 1584 var ein gyllin, er oman fyri komið fram til, at útgangsstøðið fyri skattalíkningini var ein uppteljing av húsum, sum skuldu hava skattskyldu, eina ferð í fortíðini. Við støði í jarðarbókini frá

1584 gevur hetta okkum so statt ein møguleika at meta um, hvussu nógvir garðar ella hvussu nógv hús upprunaliga vórðu sett í skatt. Áðrenn trivið verður í henda spurning, skal verða mett um, nær tann upprunaliga teljingin av skattskyldugum húsum kann vera gjørd, og harvið, nær skattapolitikkurin, sum sæst verða útintur í jarðarbókini frá 1584, kann vera byrjaður. Spurningurin um tíðarfesting er eisini viðkomandi av tí, at í føroysku søguskrivingini hevur verið tvídráttur um, nær skipanirnar, sum síggjast í jarðarbókini frá 1584, komu í lag (sbr. Degn, 1930; Thorsteinsson, 1991, 2008).

Ongar beinleiðis útsagnir eru í keldutilfarinum um tað, men onkrar ábendingar eru. Eisini kann verða samanborið við tað, sum vit vita um kongligan fíggjarpolitikk í øðrum skattlondum og øðrum pørtum av tí norska ríkinum.

Sambært Seyðabrævinum kom Landslógin, og harvið eisini heimildin um leiðangsskatt, í gildi í Føroyum millum 1274 og 1280. Lógarheimildin kann eisini vera komin við Gulatingslógini frá 1267, sum kom í gildi í Føroyum í 1271, men neyvan fyri tað. Hetta kann verða grundgivið við, at sambært rættarbótini frá 1271 høvdu føroyingar tá egna lóggávu, og at lógarheimildir um avloysing av leiðangsskyldu við skatti ikki síggjast í teimum norsku landslagslógunum fyrr enn í endurskoðanunum av teimum nakað út í 1200-árini (sbr. Bjørkvik, 1981). Ein av hesum landslagslógunum var Gulatingslógin frá 1267, har tó einans kristindómsbólkurin er varðveittur, og ikki teir partarnir, har skattareglur kunnu hava staðið. Fyrstu ferð vit í samtíðarkeldum yvirhøvur hoyra um avloysing av leiðangsskyldu við skatti, er í 1182 (Sverris saga, kap. 62). Teljingin av skattskyldugum húsum í Føroyum kann tí í fyrsta lagi vera gjørd í 1270-árunum.

Tá ið tað snýr seg um kongligan fíggjarpolitikk, so kann markatalsskipanin, sum sæst í jarðarbókini frá 1584, eisini síggjast sum ein liður í einum tílíkum fíggjarpolitikki. Eitt nú varð tað í lógarásetingunum, sum vórðu nevndar omanfyri, skipað, at skattur skuldi líknast við støði í eini meting av jarðarvirðum, hóast skatturin í Føroyum í 1584 sær út til at vera ein húsaskattur. Men hetta sæst eisini aðrastaðni í tí norska ríkinum, millum annað í Hálogalandi, har skatturin sær út til at hava verið ein persónsskattur (Bjørkvik, 1981: 441). Hóast tað í jarðarbókini frá 1584 framgongur, at skattur í Føroyum ikki upprunaliga var líknaður eftir jørð, so kunnu umlíkningar av skatti seinni, sum eisini síggjast í jarðarbókini, væl hava verið gjørdar við meting av jarðarvirðunum. Ábendingar um, nær markatalsskipanin kom í lag, eru tí eitt klípi til metingarnar um, nær tann kongligi fíggjarpolitikkurin varð verksettur, eftir at skattaskipanin í fyrsta lagi kann vera komin í Føroyum.

Í sambandi við markatalsskipanina hevur Arne Thorsteinsson ført fram, at hon neyvan er úrslit av einum kongligum politikki í hámiðøld ella seinmiðøld, men er komin við landnámsfólkunum úr Noregi longu í víkingatíð. Fatan hansara er, at hon er sprottin úr einum fólksligum tørvi á at kunna býta jørð í sambandi við arv (Thorsteinsson, 1991, 2008). Hetta metir hann við støði í landskuldarskipanini í 1584, sum hann ikki heldur líkjast tí norsku *markebolskipanini*, og annars tulkingum sínum av tilgongd í jarðarviðurskiftunum í Føroyum (sbr. Thorsteinsson, 1978, 1981). Til tulkingar hansara er tó at viðmerkja, at ongar prógvgrundir ella ábendingar finnast í tí skrivliga keldutilfari-

num, sum stuðla hesum, hvørki í Noregi, Føroyum ella aðrastaðni í tí norrøna økinum, eins og Jørn Sandnes hevur víst á (Sandnes, 1991). Eisini vísti Per Sveaas Andersen (1991) á, at tað elsta dømið um eina skipan, har eitt peningavirði í vekt ella mynt verður nýtt í sambandi við líkning av skatti og leigu í øllum Norðurvestureuropa, er í Domesday Book frá 1086 í tí normanniska Englandi. Harafturímóti hevur Brian Smith víst á við støði í tí sonevnda Papey-brævinum úr Hetlandi frá 1299 (DN 1: 89), at kongsvaldið undir Hákuni hertoga tá hevði sett í verk eina nýmeting av jørðini, sum tað átti í Hetlandi, í mun til vektvirðið av eini mørk í gulli (Smith, 2011a). Við gjølligu gjøgnumgongd síni av keldutifarinum grundgevur Smith sannførandi fyri, at ein markatalsskipan varð innførd í Hetlandi í 1290-árunum.

Í hesum sambandi skal tað verða havt í huga, at sambært Seyðabrævinum, sum varð samtykt eitt ár frammanundan, var tað í hesi tíðini eitt tætt umsitingarligt samband millum Hetland og Føroyar. Hetta kann verða sagt av tí, at tað var løgmaðurin haðani, sum saman við Erlendi biskupi í Føroyum mannaði nevndina, sum vegna Hákun hertoga gav tinginum í Føroyum tilmæli um lógarískoytið til Landslógina um føroysk búnaðarviðurskifti, sum Seyðabrævið er. Eisini høvdu arvingar hjá sýslumanni hertogans í Hetlandi í 1299, Torvaldi Tórissyni, ognaráhugamál í Føroyum í 1300-talinum (Smith, 2011b; Imsen, 2018: 136). Í valdsbýtinum eftir deyða Magnusar kongs gjørdist Eirik Magnusson kongur, meðan bróðurin, Hákun Magnusson, gjørdist hertogi og hevði stýringina av Føroyum og Hetlandi, eins og Oslo sýslu, Upplondum, Ryggjafylki og møguliga eisini Agder, undir sær. Tá ið Eirikur Magnusson doyði í 1299, gjørdist Hákun Magnusson kongur yvir øllum tí norska ríkinum. Hann varð hin síðsti kongurin av Sverraættini í faðirætt og doyði í 1319, og eftir hetta arvaðist tað norska arvaríkið gjøgnum móðurætt til Svøríkis og í 1380 til Danmarkar. Eisini í teimum landspørtunum í Noregi, har Hákun hertogi ráddi, sýnir keldutilfarið, at ein skipað virðismeting fór fram í hansara tíð í mun til virðiseindina *mørk* (Holmsen, 1962: 171). Tað er tí sera væl hugsandi, at fíggjarpolitikkurin hjá Hákuni hertoga Magnussyni í Hetlandi síðan 1290-árini, eisini hevur fevnt um Føroyar, bæði viðvíkjandi virðismeting av jørð eins og øðrum fíggjarpolitiskum viðurskiftum so sum skatti.

Í sambandi við tíðarfestingina av markatalsskipanini, sum sæst í sambandi við leiguavgjaldsskipanina hjá kongi í jarðarbókini frá 1584, kann tað eisini verða nevnt, at sambært rættarbótini frá 1271 vóru búskaparviðurskiftini í Føroyum rættiliga óskipað. Kongur sigur nevniliga, at honum er sagt frá, at í Føroyum vóru mangir menn, sum fingust við at lúgva pening og fæ undan øðrum, og tí ásetir hann í rættarbótini revsing fyri tað (DF, 1985: 25). Tað er tí væl hugsandi, at hetta er upprunin til virðismetingina av jørðini, sum kongur átti í 1584, og sum hann og kirkjan áttu fyri trúbótina.

Ein onnur ábending um, at skattaskipanin í Føroyum fór at virka, meðan Hákun V var kongur, er, at tað í testamenti hansara frá 1312-19 verður tilskilað, at inntøkur hansara av "regales" (kongsrættindum) í Hetlandi og Føroyum, altso sakaroyru og skattur, skuldu ganga til byggingina av Apostulkirkjuni í Bergen so leingi, sum hon stóð í gerð(DN 4: 128). Kongsrættindini snúðu seg í hesi tíðini ikki um inntøkurnar av jarðarogn, sum vórðu

roknaðar sum eginogn hjá kongi. Hetta bendir á, at skatturin av Føroyum eftir Landslógini var settur í verk fyri 1312-19.

Eina triðju og nakað veikari ábending fáa vit í keldutilfarinum um tey síðstu árini hjá Erlendi biskupi í Kirkjubø, sum doyði í 1308, nevniliga í eini keldu frá umleið 1420 (Kalteisen, 1899: 201–203; umseting í Krogh, 1988: 79–81) og søgn av mannamunni, sum varð niðurskrivað í 1800-talinum (Hammershaimb, 1891, I: 379-381). Í kelduni frá umleið 1420 fáast ábendingar um, at ein uppreistur var í Føroyum stutt fyri 1305, tá Erlendur biskupur orsakað av klagum frá føroyingum til kong flýddi til Noregs fyri at verja søk sína, og har búði hann, til hann doyði. Í kelduni verður millum annað sagt, at "hann ríkaði Føroya kirkju við framíhjárættindum, ognum og tímiligum lutum", og at meðan hann var í Noregi, "vórðu biskupskirkjan og biskupsgarðurin niðurbrend við sviki" (Kalteisen, 1899: 203; Krogh, 1988: 80). Í søgnini úr 1800-talinum verður sagt frá einum bóndauppreistri í sambandi við byggingina av Kirkjubømúrinum. So statt gevur tað føroyska keldutilfarið, hóast tað er brotakent og úr seinni tíð, ábendingar um, at ein bóndauppreistur var í Føroyum fyrst í 1300-talinum, sum hevði samband við miðsavnaðan fíggjarpolitikk.

Samanberast kann eisini við tann kongliga skattapolitikkin í Íslandi. Ísland gjørdist, sum tað síðsta landið í Norðuratlantshavi, norskt skattland í árunum 1262-64. Árið fyri, í 1261, høvdu grønlendingar játtað Noregs kongi tegnskyldu. Sáttmálin, sum íslendingar tá gjørdu, Gissurar sáttmáli, nevndur eftir kongsins sýslumanni í Íslandi um hetta mundið, er varðveittur, men úr seinni tíð og helst gjøgnum avskrivingar nakað litaður av politiskum viðurskiftum í tíðini eftir 1262-64. Søgufrøðingar meta tó, at avtalurnar um skatt í avtaluni eru upprunaligar (sbr. Jónsson og Boulhosa, 2011). Í tí íslendsku tillagingini av Landslógini, Jónsbók frá 1281, er avtalan nágreinað, og við støði í upplýsingunum, sum eru til skjals, meta íslendskir søgufrøðingar, at skattaavtalan frá 1262 má hava verið grundað í upplýsingini hjá Ara fróða frá uml. 1122-1133 um, hvussu nógv fólk búðu í Íslandi, tá ið landið var fullbygt í umleið 930 (Þórláksson, 2011). Eisini sæst í varðveittum íslendskum skjalsbrøvum, at Hákun V í 1311 lat gera eina uppteljing av, hvussu nógvir skattbøndur vóru í hvørjum landsparti í Íslandi um hetta mundið, og hvussu nógv hesir bøndur guldu í skatti (DI IV: 9f, II: 372 ff, XII: 20f; sbr. Karlsson, 2009: 77-81; Imsen, 2018: 97). Týðuligt er í tí íslendska keldutilfarinum, at hugtakið "skattbóndi" er eitt stovnsfest hugtak, sum sipar til garðar við skattskyldu. Hetta sýnir, at eisini í tí íslendska skattlandinum vórðu uppteljingar gjørdar av húsum ella gørðum við skattskyldu um somu tíð, sum ein líknandi miðsavnaður fíggjarpolitikkur tykist at hava verið førdur í Føroyum.

Tað er tí sannlíkt, at uppteljingin av skattskyldugum húsum ella gørðum í fortíðini, sum jarðarbókin frá 1584 gevur ábendingar um, fór fram í byrjanini av 1300-talinum, meðan Erlendur var biskupur og Hákun V var kongur, ella nøkur fá ár frammanundan, at Hákun V í 1311 lat gera eina uppteljing av bóndum í Íslandi, sum høvdu skattskyldu.

## 6 Líkningareindir í 1584 og tann upprunaliga líkningin

Hvussu nógvar líkningareindir vóru so í Føroyum, tá ið skattaskipanin varð innførd? Í Gissurar sáttmála frá 1262 varð millum annað avtalað, at hvør bóndi í Íslandi, sum áður hevði goldið fyri *þingfarakaup*, tvs. samsýning til umboð á altingi, skuldi gjalda 20 alin í vaðmali í skatti (sbr. Imsen, 2018: 48-49, 95-99). Í Jónsbók frá 1281 verður hetta nágreinað soleiðis, at helvtin av upphæddini, altso 10 alin í vaðmali, var skattur til kong og hin helvtin til tingfarakeyp, sum kongsins umboðsmenn í teimum íslendsku sýslunum umsótu og var samsýning til teirra og tingumboðini (Jónsbók, 1970, III, 1; Þórláksson, 2011: 143–146). Til samanberingar kann verða nevnt, at bæði sambært leiguavgjaldinum, sum Munkalívs kleystur tók í Føroyum í 1400-talinum, og tí føroyska landgildistakstinum í 1656, hevði grundupphæddin upp á eina gyllin, sum føroyingar guldu í skatti í 1584, sama virði sum 10 alin í vaðmali (sbr. StFS, 1908, nr. 63; Berntsen, 1971, 2. bók: 116–117). Tað er tí líkt til, at eisini líkningareindirnar í Føroyum, ella skattbøndurnir, um tøkniorðið úr teimum íslendsku keldunum frá 1311 verður nýtt, guldu 10 alin í vaðmali í skatti, tá ið uppteljingin av húsum ella gørðum við skattskyldu varð gjørd í umleið 1300.

Samanborið kann eisini verða við Jemtland, sum var tað eystasta skattlandið í tí norska ríkinum. Haðani eru eisini spjaddar upplýsingar um skattin, har hann varð goldin í stásiligum skinnum, serliga av márdýrum, men eisini íkornum. Í keldum úr 1300-talinum og 1500-talinum tykist at framganga, at hann varð goldin av gørðum ella pørtum av gørðum í mun til jarðarogn við eini upphædd úr einum hálvum márskinni upp í seks márskinn fyri hvønn garð, og at líkningin sær út til at fylgja einum mynstri, har garðarnir annaðhvørt guldu tvey ella fýra skinn hvør (Njåstad, 2011: 346; 2014: 299–301). Sambært tí norska landgildistakstinum í 1656 høvdu tvey márskinn umleið sama virði sum ein føroysk gyllin.[4] Nevnast kann, at eisini í Jemtlandi høvdu seks- ella tólvmannanevndir, mannaðar við bóndum, ein virknan leiklut í ásetingini av skatti (sbr. Njåstad, 2014: 299–300). Henda samanberingin bendir á, at skattapolitikkurin var hin sami í skattlondunum, bæði viðvíkjandi álíkningargrundarlagi, skattaupphædd og bóndaluttøku í umsitingini.

Við støði í jarðarbókini frá 1584 geva staðfestingarnar omanfyri um líkningareindir í 1584 og skattin, sum tær guldu, so statt ein møguleika fyri at meta afturlítandi um, hvussu nógvar líkningareindir ella skattbøndur vóru í Føroyum í umleið 1300, tá ið ein húsateljing tykist at vera gjørd, og eisini, hvar í landinum skattbøndurnir búðu. Hetta skal verða greinað niðanfyri.

Í jarðarbókini frá 1584 verða øll hús ella garðar í Føroyum, sum høvdu skattskyldu, nevnd við staðanavni. Staðanøvnini eru øll kend úr yngri tíð og svara til teir sonevndu

[4] Eitt márskinn hevði sama virði sum ein hálvur leypur av smøri (15,9/2 = 7,95 kg) ella ein neytahúð, sum svaraði til ein ríkisdála ella eina tunnu av harðkorni (Berntsen, 1971, 2. bók, s. 208). Sambært tí føroyska landgildistakstinum í 1656 hevði ein vág av smøri (17,9 kg) sama virði sum 1,5 gyllin (1 gn = 11,9 kg smør), og ein gyllin svaraði til ein dála (Berntsen, 1971, 2. bók: 116–118).

býlingarnar, sum vit kenna úr bygdunum í Føroyum seinni. Í teimum flestu býlingunum var ein garður, men í summum býlingum vóru fleiri skattskyldugar eindir, úr tveimum upp í sjey hús. Í summum húsum vóru eisini fleiri familjuuppihaldarar. Eisini sæst, hvussu nógv hvørt hús rindaði í skatti. Í talvu 4 sæst eitt dømi um hetta úr Porkeri.

**Talva 4**

Skattur (gyllin), hús og familjuuppihaldarar í býlingunum í Porkeri í 1584.

| **Porkeri** | **Skattur, gn** | **Hús (garðar)** | **Familjuuppi-haldarar** |
|---|---|---|---|
| Bache (í Bøkkum) | 1,15 | 2 | 2 |
| Øde Stredum (í Eystrum) | 0,5 | 1 | 2 |
| Paa Høye (á Heyggi) | 1 | 1 | 1 |
| Ved Aa (við Á) | 1,5 | 1 | 3 |
| Vnder Hamrum (undir Homrum) | 0,25 | 1 | 1 |
| Vnnder Hoye (uttan Heyga) | 1 | 1 | 1 |
| Til samans | 5,4 | 7 | 10 |

Brotpartar av virðiseindini gyllin, sum í jarðarbókini eru uppgivin í skinnum, eru umroknaðir til desimalar.

Skattaskipanin í 1584 gav kongi til samans 331 gyllin í føroyskari vøru í inntøku. Líkt er til sambært greiningini omanfyri, at uppi í teimum 331 gyllinunum eru eisini úrslitini av umlíkningum av fleiri húshaldum gjøgnum tíðina, annaðhvørt tí tey vóru farin sundur ella høvdu lagt saman, ella at ruddað hevur verið fyri nýggjum bústaði.

Um tað verður mett, at brotpartar av eini gyllin í skattauppgerðini í døminum eru úrslit av umlíkningum gjøgnum tíðina, har tann upprunaliga grundupphæddin var tað, sum seinni svaraði til eina gyllin, verður komið fram til, at tað í Porkeri vóru fýra garðar við skattskyldu í umleið 1300, ímóti sjey í 1584. Í talvu 5 er ein tílík teljing gjørd. Sambært talvuni hava býlingarnir í Eystrum og undir Homrum, sum guldu minni enn eina gyllin, ikki verið til umleið 1300, men eru úrslit av umlíkningum. Bústaðirnir hava annaðhvørt fingið tillutað jørð frá einum av hinum gørðunum í bygdini, eitt nú gjøgnum arvaskifti ella keyp, ella hava teir lagt jørð inn, so mikið, at teir staðbundnu myndugleikarnir hava mett, at teir toldu skatt. Báðir býlingarnir liggja eisini soleiðis fyri í landslagnum, at tað er týðuligt, at teir ikki hoyra til ta upprunaligu búsetingina í bygdini. Teir liggja báðir uppi í brekkuni, dygst undir bøgarðinum, og týðuliga á jørð, sum er innløgd seinni. Í býlinginum í Bøkkum, sum liggur niðri í bygdini og nærri sjónum, vóru tveir garðar ella hús í 1584, men teir høvdu minni enn tvær gyllin í skatti. Líkt er tí til, at har hevur bara verið ein garður við skattskyldu í umleið 1300, og garðurin hevur síðan fingið meira jørð, so mikið, at tann staðbundna metingarnevndin hevur mett, at neyðugt var at umlíkna. Í býlinginum við Á sær tað út til, at ein hálv gyllin í skatti er líknað afturat eftir ta upprunaligu líkningina í umleið 1300.

**Talva 5**
Meting av húsatali við skattskyldu í Porkeri í umleið 1300.

| Porkeri | Skattur, gn | Hús (garðar) í 1584 | Hús (garðar) uml. 1300 |
|---|---|---|---|
| Bache (í Bøkkum) | 1,15 | 2 | 1 |
| Øde Stredum (í Eystrum) | 0,5 | 1 | 0 |
| Paa Høye (á Heyggi) | 1 | 1 | 1 |
| Ved Aa (við Á) | 1,5 | 1 | 1 |
| Vnder Hamrum (undir Homrum) | 0,25 | 1 | 0 |
| Vnnder Hoye (uttan Heyga) | 1 | 1 | 1 |
| Til samans | 5,4 | 7 | 4 |

Umrokningin er gjørlig, tí vit enn kenna staðsetingina hjá býlingunum, og út frá tí eisini kunnu meta um ta búsetingar- og dyrkingarsøguligu gongdina í bygdunum. Eitt nú sæst hetta týðuliga í Sumba, har býlingarnir eru spjaddir, og har finst eisini eitt av fleiri dømum í jarðarbókini frá 1584 um, at garðar í einum býlingi eru farnir í tvíningar og skatturin umlíknaður samsvarandi. Í býlinginum í Hørg vóru trý hús í 1584, sum guldu til samans tvær gyllin í skatti, men tvey av húsunum, sum í mun til hitt triðja ikki sótu við kongligari festijørð, guldu ta einu gyllinina í skatti í felag við eini hálvari gyllin í part. Umlíkning kundi tí eisini føra við sær, at hús guldu minni í skatti, og dømið bendir á, at umlíkningin varð gjørd eftir, hvussu nógv jørð lá til húsini í mun til ta upprunaligu líkningina av búsetingini.

Um øll skattaupphæddin í 1584 verður upptald á henda hátt, verður komið fram til, at 305 líkningareindir ella skattbøndur vóru í Føroyum í umleið 1300. Í talvu 6 eru tølini uppsett eftir sýslum, og garðar, sum vóru frítiknir fyri skatt í 1584, eru taldir við. Vøksturin, sum tølini vísa í tíðarskeiðinum, er gjørdur upp í %. (Í fylgiskjalinum eru tølini uppsett eftir bygdum. Har sæst eisini, hvussu komið verður fram til tær 305 líkningar-eindirnar ella skattbøndurnar).

Spurningurin er so, hvussu eftirfarandi hetta er, sæð í mun til, at Føroyar í tíðini millum umleið 1300 og 1584, eins og onnur lond, vórðu rakt av hóttafallum, sum høvdu búskaparliga afturgongd við sær. Eitt nú er søgn um stórt mannafelli í sambandi við svartadeyða, sum sambært íslendskum annalum rakti Føroyar í 1349 (Isl. Ann., 1888: 224, 275, 404; sbr. Jakobsen, 1972: 46). Um mett verður út frá tí almenna fornminnalistanum (Tjóðsavnið), sæst, at 124 aðrar búsetingar eru staðfestar innangarðs í Føroyum enn tær, ið nevndar eru í 1584, og 28 búsetingar uttangarðs. Men nær tær vóru, er ikki staðfest, tíansheldur um tær vóru til í millumbilinum frá umleið 1300 til 1584. Við støði í, at tær 427 líkningareindirnar í 1584 umsótu øll jarðarvirðini í Føroyum, og at tey somu jarðarvirðini lógu til grund fyri teimum upprunaligu líkningareindunum, kann tó verða mett, at uppteljingin av gørðum í umleið 1300 er á góðari leið. Roknast má tí við, at um mannafellið av svartadeyða ella øðrum sóttum í seinmiðøld hevur verið so stórt, sum sagnirnar

**Talva 6**
Skattur og hús (garðar) við skattskyldu í 1584, meting um tal á líkningareindum (skattbóndatal) í umleið1300 og vøkstur í tíðarskeiðinum.

| Sýsla | Skattur 1584, gn | Líkningar-eindir í 1584 | Líkningareindir í uml. 1300 | Vøkstur í tíðarskeiðinum |
|---|---|---|---|---|
| Suðuroyar sýsla | 64,15 | 73 | 59 | 24% |
| Sandoyar sýsla | 43,40 | 51 | 38 | 34% |
| Vága sýsla | 29,00 | 40 | 26 | 54% |
| Streymoyar sýsla | 72,18 | 102 | 69 | 48% |
| Eysturoyar sýsla | 69,50 | 101 | 64 | 58% |
| Norðoya sýsla | 52,90 | 60 | 49 | 22% |
| Føroyar til samans | 331,13 | 427 | 305 | 40% |

siga, so eru garðar, sum kanska vórðu lagdir í oyði, endurbygdir seinni í seinmiðøld og fólkatalið annars vaksið í mun til fólkatalið í umleið1300.

## 7 Fólkatal

Staðfestingin omanfyri av, hvussu nógvar líkningareinir vóru í Føroyum í 1584 og tá ið skattaskipanin varð sett í verk umleið 1300, reisir spurningin, um tað ber til út frá hesum at meta um, hvussu nógv fólk búðu í Føroyum um hesi bæði tíðarhvarvini?

Við støði í leiguskipanini og nøvnunum á uppihaldarum, sum standa í jarðarbókini frá 1584, gjørdi Arnbjørn Mortensen (1954) eina tílíka kanning, og kom fram til, at umleið 3.180 persónar búðu í Føroyum um 1600. Hetta tal kom hann fram til við fyrst at meta um, hvussu nógvar familjur verða nevndar í jarðarbókini, tí á mongum gørðum ganga nøvn aftur. Síðan metir hann um, hvussu nógvar uppsitarafamiljur hava havt garðar hjá øðrum um hendi. Hesin parturin av kanningini sýndi, at tað veruliga uppihaldaratalið var 436 í mun til tey 532, sum eru skrásett í jarðarbókini. Við støði í einum miðaltali upp á 5 fólk í hvørjum húski, sum grundgivið verður fyri, kemur hann fram til, at tær 436 familjurnar taldu umleið 2.180 persónar. Harumframt vóru tænastufólk á gørðunum, og við støði í søguligum upplýsingum um garðsrakstur samanborið við garðsstøddir kemur hann fram til eitt miðaltal uppá eitt tænastufólk fyri hvørjar tríggjar merkur. Av tí at teir føroysku garðarnir vóru virðismettir til umleið 2.400 merkur, kemur hann fram til, at umleið 800 tænastufólk vóru á gørðunum, og hetta talið rundar hann upp til 1.000.

Arne Thorsteinsson (1978: 70-72) helt ikki hetta úrslitið vera rætt og grundgav við dømum úr jarðarbókini. Har eru bygdir, har skattakontur eru nevndar einans í sambandi við kongsjørð og ikki óðalsjørð, sum var í hesum bygdum. Eisini helt hann, vísandi til bókina hjá Lucasi Debes frá 1673, at óðalsgarðarnir ikki kunnu hava verið so stórir í miðal, sum tað verður komið fram til, tá mett verður út frá skattakontunum í jarðarbókini. Lucas Debes sigur nevniliga, at jørðin hjá óðalsbóndunum eftirhondini var sera smábýtt, og at teir ikki longur vóru ríkir, ímeðan kongsins leigubøndur nú vóru teir stóru í samfelagnum (Debes, 1963: 86, 111). So statt metti Arne Thorsteinsson, at tað mugu hava verið fleiri og smærri óðalsgarðar enn teir, ið verða nevndir í jarðarbókini, og harvið eisini fleiri fólk.

Í báðum kanningum verður sjóneykan sett á ognarbýtið í mun til býtið av kongsjørð og óðalsjørð í mun til markatalið, ímeðan minni verður gjørt burtur úr skattaskipanini. Arnbjørn Mortensen metti hana vera ein koppskattur, sum varð álíknaður øllum jarðareigarum. Arne Thorsteinsson helt tað tó vera okkurt annað slag av skatti, tí hann kundi staðfesta nógva jørð, sum ikki var umfatað av skattaskipanini. Hann sá tað tí sum ein møguleika, at kongsskatturin upprunaliga varð álíknaður gørðum, ið høvdu meira enn eitt ávíst markatal eins og kongsskatturin í Íslandi, men at kongsskatturin síðani, so hvørt sum garðarnir eru sundurskiftir, er vorðin eitt slag av bústaðarskatti, og mælir til eina nærri kanning av hesum við samanbering við grannalondini (Thorsteinsson, 1978: 70-71). Í greinini setir hann sjøtil á henda spurning úr einum fornfrøðiligum sjónarhorni út frá eini fatan, sum er grundað á útsagnirnar hjá Lucasi Debes um smáar óðalsgarðar og kemur fram til eina niðurstøðu um, hvussu búsetingin í teimum føroysku bygdunum er farin fram síðan víkingatíð, og hvussu jørð hevur arvast. Men niðurstøðan fevnir ikki um sjálva skattaskipanina og uppruna hennara.

Í kanningini omanfyri er komið fram til, at skattaskipanin í 1584 var grundað í eini uppteljing av skattskyldugum gørðum í umleið 1300, tá eisini markatalsskipanin varð innførd. Eisini er víst á, hvussu umlíkning fór fram, so hvørt sum ognarviðurskifti hjá líkningareindunum broyttust. Um vit nú venda aftur til spurningin um fólkatal, kann verða spurt, hvat nøvnini hjá uppihaldarum í jarðarbókini í grundini sýna, sæð úr einum yvirskipaðum myndugleika sjónarhorni. Eftir míni fatan sýna tey í fyrsta lagi, hvør rindaði skattin, og í minni mun, hvør sat við gørðunum, eins og Arnbjørn Mortensen eisini var inni á. Sæð úr hesum yvirskipaða sjónarhorninum, og við støði í niðurstøðunum omanfyri um umsiting, er ikki grundarlag fyri at royna at minka familjutalið ella at skyna á, um talan var um kongsjørð ella óðalsjørð, eins og Arnbjørn Mortensen gjørdi, tí fyri skattamyndugleikan var tað líka mikið, hvør átti jørðina. Í veruleikanum sigur jarðarbókin heldur einki um, hvussu óðalsjørðin var býtt millum líkningareindirnar, og tað er væl hugsandi, at líkningareindirnar í nógvum førum bæði hava sitið við kongsjørð og jørð, sum kom undir óðalsrættin, og eisini, at stórir kongsbøndur hava havt nógva óðalsjørð, sum teir hava leigað út. Teir hava ið hvussu er havt betri ráð enn smærri bøndur at gera íløgur í jørð. Rættindi til jørð og ávøkst eru væl skipað í Landslógini, bæði í arvabólkinum, óðalsloysingarbólkinum og landsleigubólkinum, og í lógini er einki, sum forðar fyri samansettum gørðum, tvørtur ímóti tykist hon at leggja upp fyri tí.

Tá ið tað snýr seg um meting av fólkatalinum, eigur tað tí eftir míni fatan heldur at vera gingið út frá uppihaldaratalinum 532, sum kemur til sjóndar í jarðarbókini, enn talinum 436, sum Arnbjørn Mortensen kom fram til, tí sambært skattaskipanini umboðar hetta talið tey, sum rindaðu skattin hjá teimum 427 líkningareindunum í 1584.

Um vit nú nýta sama roknihátt sum Arnbjørn Mortensen, at 5 fólk vóru í miðal í hvørjum húski, sum rindaði skatt ella ein part av skattinum, og at eitt tænastufólk var fyri hvørjar tríggjar merkur í jørð, verður komið fram til, at familjurnar taldu 2.660 fólk og tænastufólkini 800 fólk. Tískil búðu umleið 3.460 fólk í Føroyum í 1584. Tað gevur í miðal 8,1 fólk fyri hvørja av teimum 427 líkningareindunum.

Hetta miðaltalið samsvarar rímiliga væl við tað, sum íslendskir søgufrøðingar eru komnir fram til í sambandi við metingar av fólkatali í Íslandi, millum annað út frá skattbóndatalinum í 1311, og søguligum upplýsingum um fólkatal í hvørjum húshaldi annars. Teirra kanningar sýna, at miðal fólkatalið fyri hvønn skattskyldugan garð var úr 7,1 til 7,5 fólk (Karlsson, 2009: 82). Sambært útrokningunum omanfyri vóru líkningareindirnar í Føroyum upprunaliga 305 í tali, tá ið skattaskipanin varð sett í verk, og verður hetta faldað við 8,1, verður komið fram til, at umleið 2.471 búðu í Føroyum í umleið 1300. Í talvu 7 eru hesi tøl sett upp eftir sýslum.

**Talva 7**
Fólkatal í umleið 1300 og 1584.

| Sýsla | Fólkatal uml. 1300 | Fólkatal 1584 | Vøkstur í tíðarskeiðinum |
|---|---|---|---|
| Suðuroyar sýsla | 478 | 623 | 30% |
| Sandoyar sýsla | 308 | 432 | 40% |
| Vága sýsla | 211 | 323 | 53% |
| Streymoyar sýsla | 559 | 791 | 42% |
| Eysturoyar sýsla | 518 | 770 | 49% |
| Norðoya sýsla | 397 | 521 | 31% |
| Føroyar til samans | 2.471 | 3.460 | 40% |

## 8 Kongsútreiðslur og skattabyrða

Oman fyri varð eisini spurt, hvat skattainntøkurnar fóru til, og hvussu stór skattabyrðan var hjá teimum føroysku skattgjaldarunum? Vit hava sæð, at inntøkurnar av skatti vóru 331 gyllin í 1584. Til fíggingingina av tí kongligu umsitingini komu aftur at tí onnur kongsrættindi, sum vóru tollur og sakaroyru. Tollin kenna vit ikki, men í tingbókunum úr tíðarskeiðinum 1615-1688 sæst, at sakaroyruni vóru í miðal 112 gyllin um árið. Til samans vóru inntøkurnar av kongsrættindunum so statt umleið 443 gyllin í miðal um árið.

Louis Zachariassen (1961: 113), sum kannaði fútaroknskapirnar frá 1584 til 1652, vísti á, at kongur í tíðarskeiðinum 1600-1632 í miðal hevði 2.660 gyllin til góðar av tí føroyska búskapinum, og at tær føstu árligu útreiðslurnar vóru 291 gyllin. Tær vóru 80 gyllin í løn til fútan, 100 gyllin til skúla, 100 gyllin til hospital, 5 gyllin í samsýning til landsskrivaran og 6 gyllin í samsýning til bøðilin. Tað gevur til samans 291 gyllin í útreiðslum um árið. Harumframt vóru smærri eykaútreiðslur, eitt nú til umvæling av bygningum.

Aftur at hesum komu útreiðslur, sum ikki síggjast í fútaroknskapunum, nevniliga samsýningar til løgmann, sýslumenn, próst og prestar. Nakrar teirra síggjast tó í jarðarbókini frá 1584, har tað framgongur, at løgmaður, próstur og prestar sótu við skatta- og rentuavgjaldsfríum gørðum. Eisini sæst, at hospitalið á Argjum var frítikið fyri skatt og rentuavgjald, og til ber at rokna út virðið av hesum.

Løgmaður sat við garðinum á Steig í Sandavági, og í jarðarbókini sæst, at tann vanliga rentan av jørðini var 3,13% fyri hvørja mørk.[5] Við støði í, at grundupphæddin í skattinum var 1 gyllin, kann tað rímiliga verða mett, at virðið av skatta- og rentufrítøkuni hjá løgmanni var umleið 94 gyllin. Hetta var so statt tann kongliga samsýningin til hansara. Við støði í tí vanligu rentuni kann tað á sama hátt verða mett, at tann kongliga játtanin til hospitalið á Argjum, sum hevði 4 merkur í jørð og 7 kýr frá kongi í 1584 umframt ta árligu játtanina, var umleið 15 gyllin. Tá ið mett verður um virðið á skatta- og rentufrítøkuni hjá prósti og prestum, sæst, at tann samlaða kongliga samsýningin til teir var 401 gyllin til samans.

Hvørki í jarðarbókunum ella fútaroknskapunum sæst, at sýslumenninir vórðu samsýntir á henda hátt. Úr teimum keldunum kenna vit tó flestu teirra í tíðarskeiðinum frá 1584 til 1652 (sbr. Zachariassen, 1961: 337-343). Sýslumenn vóru vanliga úr múgvandi ættum og sótu við kongsfestum, og mangan gekk starvið í arv. Teir hava tí í 1584 myndað kjørið í tí føroysku bóndastættini. Lønarviðurskifti teirra eru ikki skipað í Landslógini, men umframt at fáa rættindi til kongsfesti hava teir helst verið samsýntir beinleiðis av bóndunum fyri tænastur sínar í nærsamfelagnum. Í Íslandi verður mett, at teir staðbundnu kongligu embætismenninir vórðu samsýntir av tingfarakeypinum (sbr. Þórláksson, 2011: 145).

Av hesum sæst, at eftir trúbótina megnaðu inntøkurnar av kongsrættindum ikki at fíggja ta kongligu umsitingina. Undan trúbótini kann verða mett, at inntøkurnar av sakaroyrum hava verið minni, og nakrar av teimum nevndu útreiðslunum hevði kongur heldur ikki tá. Um mett verður út frá tingbókunum úr tíðarskeiðinum 1615-1688, vóru

[5]Sambært jarðarbókini frá 1584 guldu 278 líkningareindir leigu til kong. Rentan var úr 1% til 12% av taksatiónsvirðinum fyri hvørja mørk. Í 135 av teimum 278 leigumálunum (49%), sum fevndu um 592 merkur (55%) av kongsjørðini, var rentan eina hálva gyllin fyri hvørja mørk ella 3,13% av taksatiónsvirðinum. Tann sama rentan sæst í eini uppskrift úr seinnu helvt av 1400-talinum um jarðargóðsið, sum Munkalívs kleystrið í Bergen átti í Føroyum, har tað við støði í tí eldra taksatiónsvirðinum, har mørkin var uppbýtt í alin, verður nevnt, at rentan av hvørjari mørk var 10 alin í vaðmali, altso 3,13% (StFS, 1908, nr. 63).

69% av sakaroyrunum fyri siðamisbrot, meðan 31% vóru fyri onnur misbrot. Fyri trúbótina fekk kirkjan sambært kristinrættinum meginpartin av inntøkunum fyri siðamisbrot, meðan kongur átti inntøkurnar fyri onnur misbrot. Inntøkurnar av kongsrættindunum hava tí ligið um 366 gyllin um árið fyri trúbótina. Men tá skuldu tær heldur ikki fíggja landsskrivarastarvið, ið sum nevnt kom í lag í 1568, ella próst og prestar ella játtaninar til skúla og hospital, sum komu í 1547 (StFS, 1908, nr. 54), og sum framman undan høvdu verið útreiðslupostar hjá tí biskupaligu umsitingini. Út frá hesum kann tí verða mett, at fyri trúbótina var betri javnvág ímillum inntøkurnar av kongsrættindunum og útreiðslurnar av tí kongligu umsitingini enn eftir trúbótina. Men har var nóg mikið at taka av, tí eftir trúbótina fekk kongur bæði rentuinntøkurnar av jarðargóðsinum, sum kirkjan hevði átt, og inntøkur, sum kirkjan hevði havt av tíggundaskipanini og sakaroyrum fyri siðamisbrot. Hvussu landsins embætismenn vórðu løntir ella samsýntir fyri trúbótina, veit tað føroyska keldutilfarið tó einki at siga um.

Nevndarmenn í løgrættinum vórðu samsýntir eftir skipanini um tingfaratoll frá 1350-1400 úr einum kassa, sum løgmaður sambært Landslógini umsat saman við einum kongsumboði og einum bóndaumboði (Kongsbókin, 3r, 12r; ML, 1915: I: 2,1b; III: 1,5). Sambært tí siðbundnu løgmanstaluni frá 1655 vóru tað sýslumenninir, sum kravdu inn (Tingbók, 1958: 12-13). Eftir skipanini úr 1300-talinum skuldu nevndarmenninir samsýnast við eini ávísari upphædd eftir, hvar í landinum teir búðu í mun til tingstaðin í Tórshavn. Við 36 nevndarmonnum, seks úr hvørjari sýslu, kann verða útroknað, at skipanin kostaði umleið 423 alin í vaðmali um árið. Skipanin er eisini kend úr tí siðbundnu løgmanstaluni, men har verður upphæddin ásett eitt sindur øðrvísi eftir, hvussu nógvar míl teir skuldu ferðast til tingstaðin. Sambært henni fingu teir nevniliga 40 danskar skillingar fyri hvørja míl.[6] Verður hetta roknað eftir sama hátti sum upphæddin varð útroknað eftir sambært ásetingunum frá 1350-1400, verður komið fram til, at í 1655 guldu bøndurnir umleið 4.480 danskar skillingar um árið í nevndarmannasamsýningum. Fyri at samanbera virðini, svaraði tað til 467 alin í vaðmali ella 46,7 gyllin um árið. Tað er tí líkt til, at gjaldið til nevndarmannasamsýningar var at kalla óbroytt í tíðarskeiðinum millum umleið 1350 og 1655. Eins og sýslumenninir hava nevndarmenninir helst eisini fingið samsýningar beinleiðis frá bóndunum fyri tænastuveitingar í nærsamfelagnum.

Til ber eisini at meta um, hvussu stór skattabyrðan hjá teimum føroysku líkningareindunum av kongsskattinum var í 1500-talinum. Umframt kongsskatt guldu føroyingar fyri trúbótina tíggjund til kirkjuligar stovnar. Sambært kristinrættinum varð tíggundin í katólskari tíð býtt í fýra partar, har ein partur fór til biskup, ein til fígging av presti, ein til fígging av kirkjum og ein til fígging av fátækrahjálp. Í tí føroyska keldutilfarinum framgongur ikki, hvussu tíggundin varð umsitin, men úr øðrum pørtum av

[6] Ein norsk míl var 11,29 km. 96 danskir skillingar gingu til ein dála, sum hevði sama virði sum ein gyllin í vøru ella 10 alin í vaðmali.

ríkinum vita vit, at ið hvussu er fátækratíggundin varð umsitin av bóndunum sjálvum, tí hon varð ofta nevnd *bóndaluturin*. Eftir trúbótina fekk kongur tann partin, sum biskupur hevði fingið fyri trúbótina, og hesin parturin varð tá nevndur kongstíggjund.

Í fútaroknskapum úr tíðarskeiðinum frá 1584 til 1652 sæst, hvussu nógv kom inn í kongstíggjund hetta tíðarskeiðið. Louis Zachariassen (1961: 70 ff.) vísti á, at hon skifti millum 132 og 408 gyllin um árið. Í miðal var kongstíggundin 210 gyllin um árið í tíðarskeiðinum. Við støði í tí kann verða mett, at tann samlaða upphæddin, sum varð goldin í tíggund, hevur verið umleið 840 gyllin í miðal um árið. So statt hevur tann samlaða framleiðslan hjá líkningareindunum í Føroyum, sum tíggjund skuldi latast av, í miðal verið umleið 8.400 gyllin um árið í tíðarskeiðinum millum 1584 og 1652. Roknast má tó við, at væl minni varð tíggjundað enn tað varð framleitt, og harvið, at tann samlaða framleiðslan sambært kongstíggjundini man vera í lægra lagi. Í sambandi við kongstíggjund í 1700-talinum vísti Anton Degn (1929: 14–15) á, at øll framleiðsla hjá bóndunum varð ikki tíggjundað, men serliga tílík vøra, sum kundi avreiðast til útflutning, meðan kongstíggjundin av aðrari framleiðslu gekk uttan um tann kongliga tíggundaroknskapin og gekk millum annað til at løna teimum staðbundnu sýslumonnunum. Tó kann verða mett, at miðaltalið omanfyri er leiðbeinandi fyri, hvussu stór tann samlaða framleiðslan hjá bóndunum í Føroyum var fyrr í 1500-talinum og eldri tíð, tá ið fólkatalið var lægri.

Sæð í mun til, at 427 líkningareindir vóru í Føroyum í 1584, harav 397 líkningareindir høvdu skattskyldu og guldu til samans 331 gyllin í kongsskatti, hevur tað árliga skattaprosentið hjá teimum føroysku líkningareindunum í endanum av 1500-talinum ligið um 4% av tí, sum tær framleiddu. Mett kann verða, at miðal framleiðslan hjá líkningareindunum í seinmiðøld neyvan hevur verið munandi størri enn hon var umleið 1600, og tískil, at kongsskattaprosentið, við støði í metingunum omanfyri um skattbóndatal og skattaupphædd í umleið 1300, í seinmiðøld hevur ligið um 4-5 % av tí virðinum, sum líkningareindirnar framleiddu. Oman á hetta komu tíggundin, sum formliga var 10% av framleiðsluni, tingfaratollurin, sum kann roknast til 0,6% av framleiðsluni, og tænastugjøldini til ta kongligu umsitingina, sum hissini vóru.

Í tingbókunum sæst, at í 1622 og 1633 hevði ein føroysk gyllin sama virði sum 1 vág av fiski (18,52 kg) ella 4 pør av morreyðum hosum (Tingbók, 1953: 164–167, 261–262). Tann samlaða framleiðslan í miðal um árið hevði so statt sama virði sum umleið 156 tons av turrum fiski ella 33.600 pør av morreyðum hosum, og kongsskatturin sum umleið 6,1 tons av fiski ella 1.324 hosupør. Sambært fútaroknskapunum framleiddu bøndurnir í Føroyum eisini smør, ull, vaðmal, skinn, tálg og fjøður, sum teir avreiddu. Um einans verður mett við støði í fiskavekt ella hosum, svaraði kongsskatturin, við 397 líkningareindum við skatti, til, at hvør líkningareind í miðal skuldi framleiða umleið 15 kg av turrum fiski ella 3,3 hosupør um árið fyri at gjalda kongsskattin í umleið 1600.

Umframt hetta varð í 1500-talinum viðhvørt goldin ein serskattur upp á tveir dálar fyri hvørja líkningareind. Ein dáli hevði í hesi tíðini sama virði sum 1 gyllin í føroyskari

vøru. Eisini skuldu teir bøndur, sum leigaðu jørð sína, annaðhvørt frá kongi ella øðrum, rinda festigjøld og rentu. Hóast fólk í Føroyum munnu hava kent skattabyrðuna ríkiliga tunga, so ber ikki til at siga, at skattainntøkurnar hjá kongi av tí føroyska skattlandinum hava verið stórar. Heldur ber til at siga, at fyri kong hevur skatturin havt symbolskan týdning fyri at minna føroyingar á, at teir vóru tegnar hansara.

## 9 Niðurstøða

Í greinini er skattaskipanin kannað við at samanbera ábendingarnar í jarðarbókini frá 1584 um, hvussu hon varð umsitin, við lóggávu og við tað brotakenda keldutilfarið viðvíkjandi Føroyum um kongsumsiting. Harumframt eru granskingarúrslit í sambandi við skattaumsiting í grannalondunum tey seinastu árini tikin við. Kanningin er gjørd við støði í afturlítandi háttalagi og metingum um, at modellir, sum eru bygd upp gjøgnum kanning av søguligum viðurskiftum í sama mentanarøki í yngri tíð, kunnu nýtast sum tulkingarkarmar í sambandi við keldur úr eldri tíð, um modellini innihalda algongd virði og spegla eitt framhald. Spurt er, hvørjar ábendingar fáast úr tí føroyska keldutilfarinum um skatt og skattaumsiting í tíðini undan 1600, nær skattaskipanin tá kann vera komin, hvussu skatturin varð líknaður, hvussu nógvir skattgjaldarar vóru, hvussu nógv fólk teir umboðaðu, hvat skatturin fór til, og hvussu stór byrðan var hjá teimum føroysku bóndunum av kongsskattinum.

Komið er fram til, at kongsumsitingin, sum í 1100-talinum var ein sýslumaður, ið hevði landið í len, varð víðkað í 1271 við tveimum lensmonnum, sum vóru hjálparmenn sýslumansins. Samstundis varð samtykt á tingi í Føroyum, at Gulatingslógin frá 1267 skuldi galda í Føroyum. Fá ár seinni, og fyri 1280, varð henda lóg avloyst av Landslógini, sum saman við Hirðlógini var krúnan á verkinum í tilgongdini at skipa tað norska ríkið í hámiðøld við stovnsfestum statsvaldi. Við Landslógini komu lógarkarmarnir fyri skatti og tí kongligu umsitingni av tí føroyska skattlandinum, sum vit best kenna úr keldutilfarinum úr 1500-talinum, meðan lógin enn var í gildi, og 1600-talinum, tá ið ein endurskoðað og víðkað útgáva av henni var í gildi. Helst er ein løgmaður settur í byrjanini av 1300-talinum at standa fyri dómsvaldinum, men eitt løgting við løgrætti sær ikki út til at vera komið í lag fyrr enn í seinnu helvt av 1300-talinum. Tá sær tað sambært keldunum út til, at landið varð skipað eftir leiðangsskipanini í Landslógini, og at staðbundnir sýslumenn, sum komu úr nærsamfelagum, vórðu settir at vera hjálparmenn sýslumansins ella fúta hansara. Umframt at taka sær av ákæru- og fíggjarheimildum sýslumansins í nærøkjunum, høvdu teir staðbundnu sýslumenninir, lensharrans ella fútans vegna, til uppgávu at tilnevna nevndarmenn til løgrættin á løgtingi, 36 nevndarmenn til samans og seks úr hvørjari sýslu.

Keldutilfarið bendir á, at skattaskipanin, sum sæst í Landslógini og var til avloysing av leiðangstænastu, varð innførd í Føroyum umleið 1300. Bæði í Landslógini, tí føroyska keldutilfarinum úr 1600-talinum og í keldunum úr øðrum norskum skattlondum eru týðuligar ábendingar um, at bøndurnir høvdu ein virknan leiklut í líkningini av skatti gjøgnum nevndir, sum lógin fyriskipaði. Í tí føroyska tilfarinum eru eisini ábendingar

um, at tað vóru nevndarmenninir á løgtingi, sum mannaðu hesar nevndir í nærøkjunum. Tí kann tað eisini verða sagt, at løgtingið ikki einans var ein dómstólur, men eisini ein partur av tí kongligu skattaumsitingini, og at teir føroysku bøndurnir í stóran mun ráddu sær sjálvum. Enn í 1500-talinum kravdu nýggir skattir eisini heimild frá løgtinginum, sum so statt, umframt uppgávuna at vera dómstólur, eisini hevði politiskar uppgávur.

Støddin á skattaupphæddini, sum sæst í jarðarbókini frá 1584, líkist henni, sum vit hava upplýsingar um úr øðrum norskum skattlondum. Skattaskipanin í 1584 bendir á, at hon var grundað á eina uppteljing av gørðum, sum skuldu hava skattskyldu, og líkningin við hesi upphædd tykist at vera gjørd um eitt mundið í fortíðini, tá ið skattaskipanin varð sett í verk, helst umleið 1300. Kanningin hevur víst, at tær 427 líkningareindirnar í 1584 upprunaliga vóru 305 líkningareindir, og við støði í jarðarbókini ber til at staðfesta, hvar í landinum hvør teirra var. Hetta sýnir ein vøkstur í talinum á líkningareindum upp á 40%. Sambært kanningini búðu umleið 2.471 fólk í Føroyum í umleið1300 og umleið 3.460 fólk í 1584.

Við inntøkutølunum úr jarðarbókini frá 1584 og miðaltølum úr fútaroknskapunum og tingbókunum úr 1600-talinum er mett um, hvat tann kongliga umsitingin kostaði í umleið 1600, samanborið við tíðina fyri trúbótina. Henda meting sýnir, at meðan inntøkurnar av kongsrættindum fyri trúbótina fíggjaðu ta kongligu umsitingina, megnaðu tær ikki hetta eftir trúbótina. Tann kongliga umsitingin eftir trúbótina var tí fíggjað við inntøkum, sum kongur yvirtók frá kirkjuni í sambandi við trúbótina. Eisini er við støði í kongstíggjundini í 1600-talinum, sum var biskupstíggundin fyri trúbótina, mett um, hvussu stór byrðan hjá teimum føroysku líkningareindunum var av kongsskattinum. Metingin sýnir, at í tíðarskeiðinum millum umleið 1300 og 1600 hevur skattaprosentið í sambandi við kongsskattin ligið millum 4 og 5% av framleiðsluni hjá teimum føroysku líkningareindunum. Í virði hevði skatturin symbolskan týdning fyri kongsvaldið fyri at minna føroyingar á, at hann var kongur teirra.

## 10 Bókmentir


Andersen, P. S. (1991). When was regular, annual taxation introduced in the Norse Islands of Britain? A comparative study of assessment systems in North-Western Europe. Scandinavian Journal of History, 16(1–2), 73–83.

Berntsen, A. (1971). Danmarckis oc Norgis fructbar Herlighed : (1656) : Reprografisk genudg. Kbh.

Bjørkvik, H. (1981). Leidang. Overgang til skatt og skattetypar. In L. Jacobsen & J. Danstrup (Eds.), Kulturhistorisk leksikon for nordisk middelalder : fra vikingetid til reformationstid (2. opl., pp. 10: 438-440). Kbh: Rosenkilde og Bagger.

Bjørkvik, H. (1982a). Bygsel. In G. Rona & A. Karker (Eds.), Kulturhistorisk leksikon for nordisk middelalder : fra vikingetid til (2. oplag, 2: 411-416). København: Rosenkilde og Bagger.

Bjørkvik, H. (1982b). Skatter. In L. Jacobsen & J. Danstrup (Eds.), Kulturhistorisk leksikon for nordisk middelalder : fra vikingetid til reformationstid (2. opl., 15: 424-435). Kbh: Rosenkilde og Bagger.

Blom, G. A. (1982). Told. In L. Jacobsen & J. Danstrup (Eds.), Kulturhistorisk leksikon for nordisk middelalder : fra vikingetid til reformationstid (2. opl., 18: 439- 443). Kbh: Rosenkilde og Bagger.

Debes, H. J. (1995). Færøerne og Norge : en tusindårig forbindelses begyndelse, forløb og afslutning. Norsk Historisk Tidsskrift.

Debes, L. J. (1963). Færoæ & færoa reserata (Ny udgave). Tórshavn: Einars Prent og Forlag.

Degn, A. (1929). Oversigt over Fiskeriet og Monopolhandelen paa Færøerne 1709-1856. Thorshavn.

Degn, A. (1930). Marken som Værdienhed paa Færøerne. Historisk Tidsskrift, 10, 68–78.

Degn, A. (1933). Kongs-, ognar- og prestajørð í Føroyum. Varðin, 13.

Degn, A. (1945). Færøske Kongsbønder 1584-1884. Thorshavn: [s.n.].

DF. (1985). Diplomatarium Færoense = Færoyskt fodnbrævasavn. In J. Jakobsen (Ed.), Færoyskt fodnbrævasavn. Tórshavn: Emil Thomsen.

DI. Diplomatarium Islandicum = Íslenzkt fornbréfasafn, sem hefir inni að halda bréf og gjörninga, dóma og máldaga, og aðrar skrár, er snerta Ísland eða ízlenzka menn. Kaupmannahöfn.

DN. Diplomatarium Norvegicum. (Christian C. A. Lange & T. Ulset, Eds.). Christiania Oslo: P.T. Malling.

Foote, P. (1970). On legal terms in Færeyinga saga. Fróðskaparrit, 18, 159–175.

Halldórsson, Ó. (1987). Færeyinga saga. Reykjavík: Stofnun Árna Magnússonar á Íslandi.

Hammershaimb, V. U. (1891). Færøsk anthologi (J. Jakobsen, Ed.). Kbh. Helgason, J. (1951). Kongsbókin úr Føroyum. Útiseti, VI, 101–122.

Historia Norwegie. (2006). Historia Norwegie (L. B. Mortensen & I. Ekrem, Eds.). Museum Tusculanum Press.

Holmsen, A. (1962). Desertion of farms around Oslo in the late middle ages. Scandinavian Economic History Review, 10(2), 165–193. https://doi.org/10.1080/035855 22.1962.10407625

Holmsen, A. (1976). Nye studier i gammel historie . Oslo: Universitetsforlaget.

Imsen, S. (1990). Norsk bondekommunalisme : fra Magnus Lagabøte til Kristian Kvart. del 1 , Middelalderen. Trondheim: Tapir Forlag.

Imsen, S. (1997). Communalism and state-building in Norway, 1537–1648. Scandinavian Journal of History, 22(1), 21–29.

Imsen, S. (2000). Hirdloven til Norges konge og hans håndgangne menn : etter AM 322 fol (S. Imsen, Ed.). Oslo: Riksarkivet.

Imsen, S. (2010). The Norwegian domination and the Norse world, c. 1100-c. 1400. In Rostra Books: Vol. no. 1. Trondheim, Norway: Trondheim, Norway: Tapir Academic Press.
Imsen, S. (2013). Law and Justice in the Realm of the King of Norway. Legislation and State Formation: Norway and Its Neighbours in the Middle Ages, 15–40.
Imsen, S. (2018). Kongemakt og skattland : den norske kongens rike utenfor Norge i middelalderen (1. utgave.). Oslo: Cappelen Damm akademisk.
Isl. Ann. (1888). Islandske Annaler indtil 1578 / udgivne for det norske historiske Kildeskriftfond ved Gustav Storm (G. Storm, Ed.). Christiania: Grøndahl.
Jakobsen, J. (1972). Færøske folkesagn og æventyr. Tórshavn: H. N. Jacobsen.
Jensen, N. J. (1976). Møntvæsenet i Danmark i den sene unionstid specielt under Christian 2. Tikið niður av https://www.danskmoent.dk/c2njj.htm
Jónsbók. (1970). Jónsbók : Kong Magnus Hakonssons Lovbog for Island, vedtaget paa Altinget 1281 og Réttarbætr, de for Island givne Retterbøder af 1294, 1305 og 1314 / udgivet efter Haandskrifterne ved Ólafur Halldórsson (Genoptrykt; Ó. Halldórsson, Ed.). Odense Universitetsforlag.
Jónsson, M., & Boulhosa, P. P. (2011). Tithe and Tribute in Thirteenth-Century Iceland. In S. Imsen (Ed.), Taxes, tributes and tributary lands in the making of Scandinavian kingdoms in the Middle Ages: Vol. No. 2 (pp. 151–163). Trondheim: Tapir Academic Press.
Kalteisen, H. (1899). Erkebiskop Henrik Kalteisens Kopibog (Bugge, Ed.). Christiania.
Karlsson, G. (2009). Lífsbjörg íslendinga : frá 10. öld til 16. aldar. In Handbók í Íslenskri Miðaldasögu: Vol. 3. Reykjavík: Háskólaútgafan.
Kongsbókin. Sth. 33 4°. Tikið niður av http://www.history.fo/index.php?id=892&L=8
Krogh, K. J. (1988). Kirkjubøstolene og kirkjubøur : et brudstykke af det færøske bispesædes historie. Tórshavn: Emil Thomsen.
ML (1915). Magnus Lagabøters landslov / Oversat av Absalon Taranger Utgit med bidrag av Universitetet (A. Taranger, Ed.). Tikið niður av https://heimskringla.no/wiki/Magnus_Lagabøters_landslov
Mortensen, Andras. (2019). Færeyinga saga som historisk kilde: En vurdering af sagaens ophavssituation og politiske miljø. Scripta Islandica: Isländska Sällskapets Årsbok, 70, 18–36.
Mortensen, Arnbjørn. (1954). Fólkatalið og ognarbýtingin í Føroyum um 1600 : við jarðabókini 1584 sum grundarlag. Fróðskaparrit. Annales Societatis Scientiarum Færoensis, 3.
Njåstad, M. (2009). Amund Sigurdsson Bolt. In Norsk biografisk leksikon. Tikið niður av https://nbl.snl.no/Amund_Sigurdsson_Bolt
Njåstad, M. (2011). How to tax a Skattland - the case of Jemtland. In S. Imsen (Ed.), Taxes, tributes and tributary lands in the making of Scandinavian kingdoms in the Middle Ages. Trondheim: Tapir Academic Press.

Njåstad, M. (2014). «Det østre riket». Kongelig administrasjon i Jemtland ca. 1300- 1500. Heimen, 51(04), 297–304.

Rindal, M., & Spørck, B. D. (2018). Kong Magnus Håkonsson Lagabøtes landslov : norrøn tekst med fullstendig variantapparat (M. Rindal, B. D. Spørck, & Arkivverket, Eds.). Oslo: Arkivverket.

Sandnes, J. (1991). Kommentar til Arne Thorsteinsson. In J. P. Joensen, R. Johansen, & J. Kløvstad (Eds.), Nordatlantisk foredrag : seminar om nordatlantisk kulturforskning i Nordens hus på Færøerne 27.-30 august 1990 (pp. 27–28). Tórshavn: Norðurlandahúsið í Føroyum.

Smith, B. (2011a). Hákon Magnusson's root-and-branch reform of public institutions in Shetland, c. 1300. In S. Imsen (Ed.), Taxes, tributes and tributary lands in the making of Scandinavian kingdoms in the Middle Ages. Trondheim: Tapir Academic Press.

Smith, B. (2011b). Some Shetland Heiresses, 1360-1660. The New Shetlander, 258.

StFS. (1908). Savn til Føroyinga sögu í l6 öld : Givið út hevir Hitt føroyska Bókmentafelagið. (A. C. Evensen, Ed.). Tórshavn.

Sverris saga. (Flateyjarbók). Tikið niður av http://heimskringla.no/wik i/Sverris_saga_(Flateyjarbók)

Thiset, A. (1915). Vaabenmærkerne for Island, Færøerne og Kolonierne : en kritisk Undersøgelse. København.

Thorsteinsson, A. (1978). Forn búseting í Føroyum. Fróðskaparrit. Annales Societatis Scientiarum Færoensis, 26, 54–80.

Thorsteinsson, A. (1981). Jordforhold i det gamle landbrugssamfund. Landinspektøren. Færøernes Kartografi, Udskiftning m.v., Særhæfte, 30, 10. hæfte, 664–678.

Thorsteinsson, A. (1991). Landbrugstradition og jordetal på Færøerne. In J. P. Joensen, R. Johansen, & J. Kløvstad (Eds.), Nordatlantisk foredrag : seminar om nordatlantisk kulturforskning i Nordens hus på Færøerne 27.-30 august 1990. Tórshavn: Norðurlandahúsið í Føroyum.

Thorsteinsson, A. (2008). Land Divisions, Land Rights, and Land ownership in the Faeroe Islands. In M. Jones & K. R. Olwig (Eds.), Nordic landscapes : region and belonging on the northern edge of Europe (pp. 77–105). Minneapolis, Minn: University of Minnesota Press.

Tingbók. (1953). Tingbókin 1615-54 (2. útg.; E. Joensen, Ed.). Tórshavn: Einar Joensen.

Tingbók. (1958). Løgtings- og Vártingsbókín 1655-66 (E. Joensen, Ed.). Tórshavn: Einars.

Tjóðsavnið. Fornminnalisti.

Wærdahl, R. B. (2011). The incorporation and integration of the king's tributary lands into the Norwegian realm, c. 1195-1397. Leiden Boston: Brill.

Weyhe, E. (2012). Um at lesa Skipan um tingfaratoll. In E. Weyhe, A. Johansen, T. Sigurðardóttir & T. Árnadóttir (Eds.), Eivindaródn : greinar 1979-2011. (pp. 515–520). Tórshavn: Fróðskapur.

Zachariassen, L. (1961). Føroyar sum rættarsamfelag : 1535-1655. Tórshavn: Føroya Fróðskaparfelag.

Þórláksson, H. (2011). Ambitious kings and unwilling farmers. On the difficulties of introducing a royal tax in Iceland. In S. Imsen (Ed.), Taxes, tributes and tributary lands in the making of Scandinavian kingdoms in the Middle Ages. Trondheim: Tapir Academic Press.

## 11 Fylgiskjal

| Sýsla, bygd, stað | Skattur 1584, gyllin | Hús 1584 | Tal á uppihald-arum 1584 | Hús uml. 1300, meting við støði í skatti 1584 |
|---|---|---|---|---|
| **Suðuroyar sýsla** | **64,15** | **73** | **100** | **59** |
| **Sumba** | **9,5** | **10** | **12** | **9** |
| Lange Gardtt (í Gørðum) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Neder Huus (í Húsatoftum) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Neder Kaalgaardr (Í Gørðum) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Offuer Kaalgaardr (í Gørðum) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Paa Krosse (á Krossi) | 1,5 | 1 | 3 | 1 |
| Vdi Hørge (Hørg) | 2 | 3 | 3 | 2 |
| Vedquea (við Kvíggjá) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Vnder Hamre (Undir Hamri) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Vágur** | **7** | **8** | **9** | **7** |
| Brecke (í Brekkugerði) | 1 | 2 | 3 | 1 |
| I Vaagetoffthe (í Toftum) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Paa Ørre (á Oyri) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Quandals Huus (við Hvanndalsá) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Smørløffue Ved Krøye (í Smillum) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Smørløffue Ved Krøye (við Kráir?) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Vid Gioffueraa (við Gjógvará) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Nes** | **2,5** | **3** | **3** | **2** |
| Med Brødellerd (við Breytalið) | 0,5 | 1 | 1 | 0 |
| Paa Jader (á Jaðri) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Siøtoffte (í Sjóvartoftum) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Porkeri** | **5,4** | **7** | **10** | **4** |
| Bache (í Bøkkum) | 1,15 | 2 | 2 | 1 |
| Øde Stredum (í Eystrum) | 0,5 | 1 | 2 | 0 |
| Paa Høye (á Heyggi) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Ved Aa (við Á) | 1,5 | 1 | 3 | 1 |
| Vnder Hamrum (undir Homrum) | 0,25 | 1 | 1 | 0 |
| Vnnder Hoye (uttan Heyga) | 1 | 1 | 1 | 1 |

| Sýsla, bygd, stað | Skattur 1584, gyllin | Hús 1584 | Tal á uppihald-arum 1584 | Hús uml. 1300, meting við støði í skatti 1584 |
|---|---|---|---|---|
| **Hov** | **8,25** | **9** | **9** | **8** |
| Braa y Hoffue (á Brúgv) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Breke (á Brekku) | 1,25 | 2 | 2 | 1 |
| Gierde (við Garð) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Hoffue | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Leffs Gaard (í Leivsgarði) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Nygaardr (í Byrgi) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Varre y Houffue (í Vørðu) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Vnnder Hamrum i Hoffue (undir Homrum) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Fámjin** | **7,5** | **9** | **14** | **6** |
| Aff Thøgum (á Teigum) | 0,5 | 1 | 1 | 0 |
| Famøe Y Hodttne (í Horni) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Foroffuenn Kierke (oman Kirkju) | 2 | 2 | 3 | 2 |
| Herdeudal (í Herdali) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Høgefledt (á Hagafløtti) | 0,5 | 1 | 1 | 0 |
| Indside Giered (í Jansagerði) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Siffuord Gardr (í Sjúrðargarði) | 0,5 | 1 | 5 | 0 |
| Thradum (í Trøðum) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Ørðavík** | **2** | **2** | **3** | **2** |
| Ørdeuig | 2 | 2 | 3 | 2 |
| | | | | |
| **Trongisvágur** | **4,25** | **6** | **6** | **4** |
| Sualballe (í Svalbarði) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Thrangis Vaage (á Húsgarði, í Húsi) | 3,25 | 5 | 5 | 3 |
| | | | | |
| **Froðba** | **5,5** | **5** | **6** | **5** |
| Frodebøe (á Bø) | 2,5 | 2 | 3 | 2 |
| Paa Hamre (uppi á Hamri) | 3 | 3 | 3 | 3 |
| | | | | |
| **Hvalba** | **12,25** | **14** | **25** | **12** |
| Garschodttne (í Garðshorni) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Gillium (í Giljum) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Í Leirum (gjaldfríur embætisgarður) | 0 | 1 | 1 | 1 |
| Nøste (við Neyst) | 2,5 | 3 | 3 | 2 |
| Paa Høye (á Heyggi) | 0,5 | 1 | 1 | 0 |

| Sýsla, bygd, stað | Skattur 1584, gyllin | Hús 1584 | Tal á uppihald-arum 1584 | Hús uml. 1300, meting við støði í skatti 1584 |
|---|---|---|---|---|
| Qualbø Y Schalle (í Skálum) | 3,25 | 4 | 6 | 3 |
| Smortoffthe (við Toftir) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Vestrre Hamre (vestur á Hamri) | 2 | 1 | 6 | 2 |
| Wdi Nesse och Varde (í Nesi og undir Vørðu) | 1 | 1 | 5 | 1 |
| | | | | |
| **Sandoyar sýsla** | **43,4** | **51** | **68** | **38** |
| **Stóra Dímun** | **1** | **1** | **1** | **1** |
| Storre Dimmen (Stóra Dímun) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Skúvoy** | **7,4** | **10** | **11** | **6** |
| Brede Stuue (í Skúvoy) | 1,9 | 4 | 4 | 1 |
| Storre Stuffue (í Skúvoy) | 3 | 3 | 4 | 3 |
| Syslemanndtz Stuue (í Skúvoy) | 1,5 | 2 | 2 | 1 |
| Vdi Hodtnne (í Ólansgarði) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Skarvanes** | **2** | **2** | **3** | **2** |
| Skarffuennes (á Skarvanesi) | 2 | 2 | 3 | 2 |
| | | | | |
| **Dalur** | **3,5** | **3** | **4** | **3** |
| Paa Dall (í Dali) | 3,5 | 3 | 4 | 3 |
| | | | | |
| **Húsavík** | **4** | **5** | **5** | **3** |
| Husseuigh | 3,5 | 4 | 4 | 3 |
| Søder y Hage y Husseuigh (suðuri í Haga) | 0,5 | 1 | 1 | 0 |
| | | | | |
| **Skálavík** | **11** | **11** | **18** | **11** |
| Hagebrecke (undir Hagabrekku) | 6 | 6 | 10 | 6 |
| Hiem aa Dall (í Dalsgarði) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Paa Hamre (á Hamri) | 2 | 2 | 2 | 2 |
| Paa Jnnderdall (í innara Dal) | 1 | 1 | 3 | 1 |
| Paa Kierckegierde (í Kirkjugerði) | 1 | 1 | 2 | 1 |
| | | | | |
| **Sandur** | **14,5** | **19** | **26** | **12** |
| Aargaardt (uttan Á) | 2 | 2 | 3 | 2 |
| Hallkebreke (undir Halgabrekku) | 1 | 1 | 2 | 1 |
| Norder Thodnnes och Sønnder Todnnes (í Todnesi) (gjaldfríur embætisgarður) | 0 | 1 | 1 | 0 |

| Sýsla, bygd, stað | Skattur 1584, gyllin | Hús 1584 | Tal á uppihald-arum 1584 | Hús uml. 1300, meting við støði í skatti 1584 |
|---|---|---|---|---|
| Paa Braa (undir Breytasandi ?) | 0,5 | 1 | 1 | 0 |
| Paa Hodtnne (í Horni) | 0,5 | 1 | 1 | 0 |
| Paa Høye (á Heyggi) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Paa Kiødtte (í Koytu) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Paa Sølle (í Soylu) | 1 | 1 | 3 | 1 |
| Paa Tradegaard (í Trøðum) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Sannde Gard (á Sondum) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Sanndisbreche (norðri á Bø) | 2,5 | 5 | 5 | 2 |
| Vdt aa Røenn (úti á Reyni) | 0,5 | 1 | 1 | 0 |
| Vnnder Scharde (undir Skarði) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Wnnder Røenn (undir Reyni) | 1,5 | 1 | 4 | 1 |
| | | | | |
| **Vága sýsla** | **29** | **40** | **50** | **26** |
| **Sandavágur** | **5,5** | **8** | **9** | **6** |
| Sannde Vaage (á Sondum) | 5,5 | 7 | 8 | 5 |
| Stege Gardett (á Steig) (gjaldfríur embætisgarður) | 0 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Miðvágur** | **6** | **9** | **13** | **6** |
| Anside Gierde (í Jansagerði) (gjaldfríur embætisgarður) | 0 | 1 | 1 | 1 |
| Erichstoff (við Eirikstoftir) | 0,25 | 1 | 1 | 0 |
| Jnnde y Huusse (inni í Húsi) | 1,5 | 1 | 2 | 1 |
| Kalffueleye (í Kálvalíð) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Paa Rygge (á Ryggi) | 3,25 | 5 | 8 | 3 |
| | | | | |
| **Sørvágur** | **3** | **2** | **3** | **3** |
| Sørre Vaage (í Seyrvági) | 3 | 2 | 3 | 3 |
| | | | | |
| **Bøur** | **2,75** | **4** | **5** | **2** |
| Bøe (í Bø) | 2,75 | 4 | 5 | 2 |
| | | | | |
| **Gásadalur** | **3,5** | **3** | **5** | **3** |
| Gaassedal Vp meth Gaardtt (uppi við Garð) | 1,5 | 2 | 3 | 1 |
| Vid Graatenn (við Grástein) | 2 | 1 | 2 | 2 |
| | | | | |
| **Mykines** | **8,25** | **14** | **15** | **6** |
| Forhaanndenn Aa (handan Á) | 2,25 | 3 | 3 | 2 |
| Jnnde y Stuue (á Bø) | 2,75 | 5 | 5 | 2 |
| Paa Tødall (á Tøðali) | 1,75 | 3 | 4 | 1 |

| Sýsla, bygd, stað | Skattur 1584, gyllin | Hús 1584 | Tal á uppihald-arum 1584 | Hús uml. 1300, meting við støði í skatti 1584 |
|---|---|---|---|---|
| Vdi Stuue (á Bø) | 1,5 | 3 | 3 | 1 |
| | | | | |
| **Streymoyar sýsla** | **72,18** | **102** | **117** | **69** |
| **Koltur** | **2** | **2** | **2** | **2** |
| Hiem y Hussegardt (heimi í Húsi) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Paa Gierdum (norð í Gerði) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Hestur** | **4** | **4** | **4** | **4** |
| Hest (í Hesti) | 4 | 4 | 4 | 4 |
| | | | | |
| **Nólsoy** | **10,75** | **15** | **16** | **10** |
| Nolssøe (í Nólsoy) | 9 | 11 | 12 | 9 |
| Paa Kornnedall (í Korndali) | 1,75 | 4 | 4 | 1 |
| | | | | |
| **Kirkjubøur** | **2** | **3** | **2** | **2** |
| Arge (á Argjum) (hospital) | 0 | 1 | 0 | 0 |
| Kierche Bøe Gaardt (heimi á Garði) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Vd aa Bøe (úti á Bø) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Velbastaður** | **5** | **11** | **13** | **5** |
| Adt Stennum (á Steinum) | 2 | 2 | 2 | 2 |
| Noreraa Høye (norðuri á Heyggi) | 1 | 6 | 6 | 1 |
| Valbøsted Vde paa Hyoe (úti á Heyggi) | 2 | 3 | 5 | 2 |
| | | | | |
| **Syðradalur** | **0** | **1** | **1** | **1** |
| Sønnerdal (í Syðradali) (gjaldfríur embætisgarður) | 0 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Norðradalur** | **2,5** | **3** | **3** | **2** |
| Neffmtons Gaard (á Sævarong ?) | 1 | 2 | 2 | 1 |
| Norderdall (í Norðradali) | 1,5 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Skælingur** | **1** | **1** | **1** | **1** |
| Skellinnge (á Skælingi) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Leynar** | **2** | **2** | **2** | **2** |
| Lønnhaffue (í Leynum) | 2 | 2 | 2 | 2 |

| Sýsla, bygd, stað | Skattur 1584, gyllin | Hús 1584 | Tal á uppihald-arum 1584 | Hús uml. 1300, meting við støði í skatti 1584 |
|---|---|---|---|---|
| **Kvívík** | **5,8** | **15** | **15** | **6** |
| Faar hiemmen Aa (heiman Á) | 4,8 | 11 | 11 | 4 |
| Paa Helde (á Hellugarði) | 1 | 3 | 3 | 1 |
| Queuig Kiercke Theig (á Kirkjuteigi) (gjaldfríur embætisgarður) | 0 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Vestmanna** | **6,13** | **9** | **11** | **5** |
| Gierdum (í Gørðum) | 3,63 | 6 | 7 | 3 |
| Paa Delde (á Deild) | 0,5 | 1 | 1 | 0 |
| Paa Roffue (á Rógvu) | 1 | 1 | 2 | 1 |
| Vesmennde Haffnn | 1 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Saksun** | **3** | **3** | **5** | **3** |
| Paa Duffue gaardenn (í Dúvugørðum) | 2 | 2 | 4 | 2 |
| Sax Haffue Paa Suertaa (við Svartá) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Tjørnuvík** | **2** | **2** | **3** | **2** |
| Thiørnneuig (í Tjørnuvík) | 2 | 2 | 3 | 2 |
| | | | | |
| **Haldórsvík** | **2,5** | **4** | **10** | **2** |
| Haldersuigh (í Haldórsvík) | 2,5 | 4 | 10 | 2 |
| | | | | |
| **Streymnes** | **2** | **2** | **2** | **2** |
| Strømmennes (á Streymnesi) | 2 | 2 | 2 | 2 |
| | | | | |
| **Hvalvík** | **2** | **2** | **2** | **2** |
| Paa Qualuig (í Hvalvík) | 2 | 2 | 2 | 2 |
| | | | | |
| **Hósvík** | **2** | **3** | **3** | **2** |
| Paa Tofftum (í Toftum) | 1 | 2 | 2 | 1 |
| Thorsuig Paa Garss Ennde (í Garðsenda) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Kollafjørður** | **9** | **12** | **12** | **9** |
| Koldefiord Paa Kieldnes (á Kjalnesi) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Paa Hamrum (í Homrum) | 2 | 2 | 2 | 2 |
| Paa Høye (á Heyggi) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Paa Meddtt Jord (á Miðgerði) | 1 | 2 | 2 | 1 |

| Sýsla, bygd, stað | Skattur 1584, gyllin | Hús 1584 | Tal á uppihald-arum 1584 | Hús uml. 1300, meting við støði í skatti 1584 |
|---|---|---|---|---|
| Paa Øringum (á Oyrareingjum) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Paa Signnebøe (á Signabø) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Paa Thodnnes (á Todnesi) | 1 | 3 | 3 | 1 |
| Vid Sioff (við Sjógv) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Kaldbak** | **3,25** | **3** | **4** | **3** |
| Jnnde aa Boe (inni á Bø) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Kalback Vd meth Aa (úti við Á) | 1,25 | 1 | 2 | 1 |
| Solle Gaardett (í Soylugørðum) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Sund** | **1,5** | **1** | **1** | **1** |
| Sundaze Gardt (á Sundi) | 1,5 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Hoyvík** | **2** | **2** | **2** | **2** |
| Houigh (heimi á Garði) | 2 | 2 | 2 | 2 |
| | | | | |
| **Tórshavn** | **1,75** | **2** | **3** | **1** |
| Sannde Gierde | 0,25 | 1 | 1 | 0 |
| Thorschaffnn, Huussegaardt | 1,5 | 1 | 2 | 1 |
| | | | | |
| **Eysturoyar sýsla** | **69,5** | **101** | **121** | **64** |
| **Strendur** | **6,75** | **9** | **11** | **6** |
| Gierdum (í Gerðum) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Hiem aa Høye (á Heyggi) | 1,5 | 3 | 3 | 1 |
| Seblennde (í Sevlendi) | 1,25 | 2 | 3 | 1 |
| Vid Siøff (við Sjógv) | 3 | 3 | 4 | 3 |
| | | | | |
| **Selatrað** | **4** | **5** | **5** | **3** |
| Hiem aa Bøe (heimi á Bø) | 2,5 | 3 | 3 | 2 |
| Paa Medtt Hodnn (í Mittúni) | 0,5 | 1 | 1 | 0 |
| Selletrunde Vde paa Høye (á Heyggi) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Oyri** | **1** | **1** | **1** | **1** |
| Paa Ørre (á Oyri) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Norðskáli** | **1** | **1** | **1** | **1** |
| Norder vedt Schalle (við Norðskála) | 1 | 1 | 1 | 1 |

| Sýsla, bygd, stað | Skattur 1584, gyllin | Hús 1584 | Tal á uppihald-arum 1584 | Hús uml. 1300, meting við støði í skatti 1584 |
|---|---|---|---|---|
| **Eiði** | **6** | **9** | **9** | **6** |
| Eydde (á Eiði) | 6 | 9 | 9 | 6 |
| | | | | |
| **Gjógv** | **2,5** | **5** | **5** | **2** |
| Vid Giou (við Gjógv) | 2,5 | 5 | 5 | 2 |
| | | | | |
| **Funningur** | **5,25** | **8** | **10** | **5** |
| Fundinge (í Funningi) | 4 | 6 | 7 | 4 |
| Jnnde i Husse (inni í Húsi) | 1,25 | 2 | 3 | 1 |
| | | | | |
| **Skála** | **6,75** | **11** | **15** | **6** |
| Hiem ad Skaalle Y Groff (í Grógv) | 2 | 2 | 2 | 2 |
| Op y Hodttne (uppi í Horni) | 2 | 1 | 2 | 2 |
| Siffuortonn (í Sjóvartúni) | 1,5 | 3 | 6 | 1 |
| Skaalle Yttre Skaalle (á ytra Skála) | 1,25 | 5 | 5 | 1 |
| | | | | |
| **Elduvík** | **3** | **4** | **4** | **3** |
| Elleuigh (í Elduvík) | 3 | 4 | 4 | 3 |
| | | | | |
| **Oyndarfjørður** | **3,5** | **8** | **9** | **4** |
| Anndefiordtt (í Sjóvartúni ?) | 3,5 | 7 | 8 | 3 |
| Garschodttenne (í Garðshorni) (gjaldfríur embætisgarður) | 0 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Fuglafjørður** | **5** | **5** | **11** | **4** |
| Foruden Aa (um Á) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Fugilfiordtt Vp vid Gaard (við Garð) | 2,5 | 2 | 4 | 2 |
| Gioffueraa (við Gjógvará) | 1,5 | 2 | 6 | 1 |
| | | | | |
| **Leirvík** | **4,75** | **7** | **7** | **4** |
| Foruden Aa (uttan Á) | 2,25 | 4 | 4 | 2 |
| Leruig Thoffnes (á Toftanesi) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Vp med gaardt (við Garð) | 1,5 | 2 | 2 | 1 |
| | | | | |
| **Norðragøta** | **5** | **5** | **6** | **5** |
| Norderøaa Gatte (í Norðragøtu) | 5 | 5 | 6 | 5 |

| Sýsla, bygd, stað | Skattur 1584, gyllin | Hús 1584 | Tal á uppihald-arum 1584 | Hús uml. 1300, meting við støði í skatti 1584 |
|---|---|---|---|---|
| **Gøtugjógv** | **1** | **1** | **2** | **1** |
| Vid Gioff (við Gøtugjógv) | 1 | 1 | 2 | 1 |
| | | | | |
| **Syðrugøta** | **4** | **4** | **6** | **3** |
| Sønnder Gatte (í Syðrugøtu) | 2,5 | 1 | 3 | 2 |
| Vdi Groff (úti í Grógv) | 1,5 | 3 | 3 | 1 |
| | | | | |
| **Søldarfjørður** | **2** | **2** | **2** | **2** |
| Salmande Fiordt (heimi á Bø) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Vdttbøe (á Útbø) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Lamba** | **1** | **1** | **1** | **1** |
| Lamhauge (í Lamba) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Glyvrar** | **2,5** | **3** | **3** | **2** |
| Gliffuerom (á Glivrum) | 2,5 | 3 | 3 | 2 |
| | | | | |
| **Toftir** | **4,5** | **11** | **12** | **4** |
| Hiem aa Tofftum (heimi á Toftum) | 1,5 | 2 | 3 | 1 |
| Tofftum Jnnd aa Høye (inni á Heyggi) | 1 | 2 | 2 | 1 |
| Vp y Høye (á Torkilsheyggi) | 2 | 7 | 7 | 2 |
| | | | | |
| **Nes** | **0** | **1** | **1** | **1** |
| Ness (á Nesi) (gjaldfríur embætisgarður) | 0 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Norðoya sýsla** | **52,9** | **60** | **76** | **49** |
| **Blankskáli** | **2,5** | **1** | **4** | **2** |
| Blanckschaalle (á Blankskála) | 2,5 | 1 | 4 | 2 |
| | | | | |
| **Húsar** | **3** | **5** | **7** | **3** |
| Kallsøe Hussum (Húsar) | 3 | 5 | 7 | 3 |
| | | | | |
| **Mikladalur** | **3,75** | **4** | **4** | **3** |
| Møchledall, For sønndenn och nordenn Aaen (í Mikladali) | 3,75 | 4 | 4 | 3 |
| | | | | |
| **Trøllanes** | **2** | **2** | **2** | **2** |
| Troldennes (á Trøllanesi) | 2 | 2 | 2 | 2 |

| Sýsla, bygd, stað | Skattur 1584, gyllin | Hús 1584 | Tal á uppihald-arum 1584 | Hús uml. 1300, meting við støði í skatti 1584 |
|---|---|---|---|---|
| **Kunoy** | **3,5** | **4** | **6** | **3** |
| Kunnø Hiem i Huusse (heimi í Húsi) | 2 | 2 | 2 | 2 |
| Suiderbøe (suður á Bø) | 1,5 | 2 | 4 | 1 |
| **Haraldssund** | **1** | **1** | **1** | **1** |
| Harrillsanndt (í Haraldssundi) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| **Skarð** | **2,5** | **2** | **5** | **2** |
| Scharde (á Skarði) | 2,5 | 2 | 5 | 2 |
| **Norðoyri** | **3** | **3** | **3** | **3** |
| Ørre (á Oyri) | 3 | 3 | 3 | 3 |
| **Klaksvík** | **8,15** | **11** | **11** | **8** |
| Gierdum (Gerðum, uppi á Grundum) | 3 | 4 | 4 | 3 |
| Mørckennoo y Bordoe (á Myrkjanoyri) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Vaage (í Vági) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Vp Sallum (á Uppsølum) | 3,15 | 5 | 5 | 3 |
| **Strond** | **1,5** | **1** | **4** | **1** |
| Strandtt (á Strond) | 1,5 | 1 | 4 | 1 |
| **Skálatoftir** | **1,5** | **1** | **1** | **1** |
| Skaallethoffthe (á Skálatoftum) | 1,5 | 1 | 1 | 1 |
| **Múli** | **1,5** | **2** | **3** | **1** |
| Mulle (á Múla) | 1,5 | 2 | 3 | 1 |
| **Depil** | **1** | **1** | **1** | **1** |
| Deble (í Depli) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| **Norðtoftir** | **1** | **1** | **1** | **1** |
| Tofftum (á Norðtoftum) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| **Árnafjørður** | **1** | **1** | **1** | **1** |
| Arnnefiordt (í Árnafirði) | 1 | 1 | 1 | 1 |

| Sýsla, bygd, stað | Skattur 1584, gyllin | Hús 1584 | Tal á uppihald-arum 1584 | Hús uml. 1300, meting við støði í skatti 1584 |
|---|---|---|---|---|
| **Hvannasund** | **2** | **2** | **2** | **2** |
| Quannd Sanndt (í Hvannasundi) | 2 | 2 | 2 | 2 |
| | | | | |
| **Viðareiði** | **3** | **4** | **4** | **4** |
| Foldenn (í Follendi) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Gaardt (við Garð) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Viderøe Høye (á Heygum) | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Vnna Gierde (í Ónagerði) (gjaldfríur embætisgarður) | 0 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Svínoy** | **5** | **4** | **6** | **5** |
| Hiem y Huusse (Heimi á Bø ?) | 4 | 3 | 5 | 4 |
| Suinoe | 1 | 1 | 1 | 1 |
| | | | | |
| **Fugloy** | **2,5** | **4** | **4** | **5** |
| Fugløe Ad Kircke (á Kirkju) | 2,5 | 4 | 4 | 2 |
| Hatteruigh (í Hattarvík) | 3,5 | 6 | 6 | 3 |

Brotpartar av gyllin, sum í jarðarbókini eru uppgivin í skinnum, eru umroknaðir til desimalar.